# STARVSFÓLKASÁTTMÁLI

# 2015

# millum

# FAG

# og

# YTF

Galdandi fyri peningastovnar og tryggingarfeløg

# Innihaldsyvirlit

***1. Kapittul: Starvssáttmáli* ... 3**
§1. Sáttmálaøki ... 3
§2. Setan í starv ... 3
§3. Arbeiðstíð ... 4
§4. Lønir og flokkingar ... 6
§5. Eftirløn og tryggingar ... 6
§6. Sjúka ... 7
§7. Frítíð og frídagar ... 8
§8. Barnsburðarfarloyvi og ættleiðing ... 9
§9. Farloyvi ... 10
§10. Flytiendurgjald / Fyribils tænasta í hægri starvi ... 10
§11. Tænastuferðir ... 11
§12. Útbúgving ... 11
§13. Álitisfólk og samstarvsnevnd ... 12
§14. Nevndarlimir og útbúgvingargrunnur ... 12
§15. Eftirsitiløn ... 13
§16. Úr starvi ... 13
§17. Gildiskoma og endi sáttmálans ... 15

***2. Kapittul: Lønir og flokkingar* ... 16**
2a. Lønir og flokkingar av peningastovnunum ... 16
2b Lønartalva peningastovnarnir galdandi frá 1. mai 2015 ... 20
Lønartalva peningastovnarnir galdandi frá 1. mai 2016 ... 22
2c Løn og flokkingar tryggingarfeløgini ... 26
2d Lønartalva tryggingarfeløgini ... 31

***3. Avtala millum FAG og YTF um álitisfólk* ... 36**

***4. Avtalur um samstarvsnevndir* ... 39**

***5. Protokollat um eldrapolitik* ... 43**

***6. Protokollat um ambæting av sjálvtøkum og serlig boðsending* ... 44**

***7. Protokollat um hugtøk, ið partarnir nýta í sáttmálasamráðingum* ... 45**

***8. Høvuðsavtala millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og SFS* ... 46**

***9. Høvuðsavtala millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Yrkisfelagið Trygdina* ... 50**

# 1. Kapittul: Starvssáttmáli

### *§1. Sáttmálaøki*

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um øll starvsfólk, sum eru í starvi í føroyska fíggjar- og tryggingarheiminum. YTF er Yrkisfelag teirra, ið starvast innan tryggingar-, fíggjar-, KT og líknandi fyritøkum her eftir nevndir YTF.

Sáttmálin fevnir tó ikki um:
a. Kantinu- og reingerðarfólk.
b. Mánaðar- og tímalønt fyribilshjálp við minni enn 15 tíma viku.
c. Starvsfólk, sum serligur sáttmáli er gjørdur fyri, starvsfólkið og fyritøkuna millum, ella sum annars við seravtalu partanna millum eru undantikin hesum sáttmála. Tílíkir sáttmálar ella seravtalur kunnu bert gerast fyri leiðandi starvsfólk og/ella serfrøðingar, og vil fyritøkan tryggja, at hesi starvsfólk ikki hava vánaligari kor, enn tey, sum eru ásett í sáttmálanum við YTF.

Fyri starvssettu fólkini er sáttmálin galdandi og annars løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um rættarviðurskifti arbeiðsgevara og starvsmanna ímillum, við møguligum seinni broytingum.

Fyri næmingar er sáttmálin galdandi og annars ásetingarnar í løgtingslóg nr. 94 frá 29.12.1998 um yrkisútbúgvingar við seinni broytingum, og somuleiðis løgtingslóg nr. 107 frá 29.12.1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, við møguligum seinni broytingum.

Stk. 3. Limagjald til YTF skal verða frádrigið í lønarútgjaldingini og goldið felagnum, samstundis sum lønin verður goldin.

### *§2. Setan í starv*

Stk. 1. Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um setanarprógv.

Stk. 2. Skipað verður fyri árligum starvsfólkasamrøðum millum tilvístan leiðara og/ella starvsfólkaleiðara og starvsfólkið. Leiðarin tekur stig til samrøðuna

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**

Stk. 3 Í august ella september á hvørjum ári skal stjórin saman við deildarleiðarunum gera metingar um framflutningar av starvsfólki. Hesar metingar verða lagdar fyri álitisfólkini til ummælis.

## *§3. Arbeiðstíð*

**Stk. 1. Arbeiðstíð**

**a.**

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Arbeiðstíðin er 37 tímar um vikuna, døgurðasteðgir á 30 minuttir eru ikki íroknaðir. Hetta svarar til 1924 tímar árliga

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna, døgurðasteðgir á 30 minuttir eru ikki íroknaðir. Hetta svarar til 1820 tímar árliga.

**b.**
Starvsfólk eiga rætt til 30 min. samanhangandi døgurðasteðg. Døgurðasteðgurin verður roknaður sum frítíð, sum starvsfólkið frítt kann ráða yvir. Í teimum førum, tá ið tað er álagt starvsfólki at vera til taks í døgurðasteðginum, verður døgurðasteðgurin at rokna upp í arbeiðstíðina.

**Stk 2. Daglig arbeiðstíð**

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Eik Banki/sparikassarnir kunnu eftir tørvi leggja dagligu arbeiðstíðina hjá starvsfólkunum innan fyri fimm teir fyrstu dagarnar í vikuni í niðanfyrinevndu tíðarskeið:

| | |
|---|---|
| 3 dagar í tíðini | kl. 8.00 - 17.30 |
| 1 dag í tíðini | kl. 8.00 - 18.30 |
| Fríggjadag í tíðini | kl. 8.00 - 17.30 |

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Dagliga arbeiðstíðin er í tíðini frá kl. 08:00 til kl. 16:00.

Avgreiðslutíðin er 7,5 tímar dagliga.

**Stk. 3. Broyting í arbeiðstíðini**

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Møgulig broyting av fastløgdu dagligu arbeiðstíðini skal fráboðast minst 2 vikur frammanundan.

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Møgulig broyting av fastløgdu dagligu arbeiðstíðini skal avtalast og fráboðast minst 4 vikur frammanundan.

**Stk. 4. Flekstíð**
Flekstíðarskipan kann setast í verk lokalt. Fleks- og fikstíð verða avtalaðar millum arbeiðsgevara og álitisfólk og góðkent av YTF.

**Stk. 5. Úrtíðararbeiði**
Arbeiðsgevarin kann gera avtalu við starvsfólkið um úrtíðarbeiði út yvir fastløgdu/avtalaðu arbeiðstíðina, fyri ávíst fastlagt tíðarskeið. Úrtíðararbeiði skal so vítt møguligt avmarkast.

Er brádliga uppstaðin arbeiðstørvur, eigur starvsfólkið - um gjørligt - at fylgja áheitanini um úrtíðararbeiði.

Serlig tilkallan:

Tá starvsfólk eftir boðum møtir aftur til arbeiðis, eftir at vanliga arbeiðstíðin er lokin, og starvsfólkið er farið av arbeiðsplássinum, verður veitt úrtíðargjald fyri 2 tímar eyka. Hetta er ikki galdandi fyri starvsfólk, sum fáa viðbót fyri at vera tøk.

Fyri úrtíðararbeiði, ið fer út um 2 tímar, eiga starvsfólk rætt til 1/2 tíma mattíð uttan frádrátt. Arbeiðsgevarin syrgir fyri mati.

Úrtíðarbeiði verður lønt sum avspáking.
Fyri 1. og 2. tíma verður avspákað 1 tíma + 50%. Roknað verður við byrjaðum korterum.
Fyri 3. og fylgjandi tímar, eins og leygardagar, sunnudagar og halgidagar/fastar frídagar verður avspákað 1 tími + 100%.

Avtalast kann millum arbeiðsgevaran og starvsfólkið, um tað vil hava úrtíðargjald, samsvarandi omanfyri nevndu reglum um avspáking, ella tilsvarandi frítíð fyri úrtíðararbeiði. Talið av úrtíðararbeiðstímum verður gjørt upp seinast í hvørjum mánaði.

Ber ikki til at halda frí, tá ið starvsfólk ynskir tað, skal avtalast, nær uppsparda frítíðin kann verða hildin í staðin; avtala um hetta skal fyriliggja innan 3 mánaðir.

Parttíðarsett starvsfólk fáa vanliga tímaløn fyri úrtíðararbeiði innan fyri vanligu arbeiðstíðina.

Nágreiniligari reglur kunnu avtalast lokalt.

**Stk. 6. Arbeiðstíð hjá starvsfólki við serligari ábyrgd**

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Leiðarar og starvsfólk, sum eru lønt ájavnt við 4 lønarflokk ella hægri, tilskriva ikki yvirtíð.

Fyri hesi kann samsýningin fyri møguligt meirarbeiði – við atliti til starvið – eftir avtalu heilt ella partvíst verða ein partur av lønini, eins og avtala kann gerast um samsýning fyri møguligt meiraarbeiði.

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Fyri starvsfólk við serligari ábyrgd eigur at strembast ímóti at arbeiðstíðin ikki fer upp um arbeiðstíðina sambart § 3 stk. 1.

Fyri hesi starvsfólk við serligari ábyrgd, kann samsýningin fyri møguligt meirarbeiði - vísandi til starvsstøði - eftir avtalu við setan vera tikin fult ella partvíst við í lønini, ella kunnu serligar skipanir í setanarviðurskiftunum eftir avtalu loyva hóskandi samsýning fyri møguligt meirarbeiði ella frítíð.

Stavar meirarbeiði fyri hesi starvsfólk frá innanhýsis viðurskiftum, ið viðkomandi starvsfólk ikki hevur leiðslu av, verður hetta meirarbeiði at samsýna eftir vanligu reglunum

| | |
|---|---|
| | fyri yvirtíð smb. § 3, stk. 5. |

**Stk. 7. Niðursett arbeiðstíð**
Niðursett arbeiðstíð kann verða loyvd, har umstøður eru til tess. Lønin verður tá lækkað samsvarandi lønarsáttmálanum.

| | |
|---|---|
| | **Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**<br>Starvsfólk, ið eru fylt 60 ár, kunnu eftir umsókn fáa niðursetta arbeiðstíð, og søkja um at pensiónsgjøldini verða óbroytt, hóast lønin tá verður lækkað í mun til tíðina. |

## *§4. Lønir og flokkingar*

Lønir og flokkingar fyri peningastovnarnar eru sambært skjal 2, og lønir og flokkingar fyri tryggingarfeløgini eru sambært skjal 3.

## *§5. Eftirløn og tryggingar*

**Stk. 1. Eftirløn**
Starvsfólk verða upptikin í eftirlønarskipanina, tá royndartíðin er av. Næmingar verða upptiknir í eftirlønarskipanina, tá lærutíðin er av.

Starvsfólk hava arbeiðsgevaragoldna eftirløn, ið er 18%

| **Galdandi fyri peningastovnarnar:** | **Galdandi fyri tryggingarfeløgini:** |
|---|---|
| Tó er galdandi, at starvsfólk, sum eru sett fyri styttri enn 1 ár, verða ikki innlimað í eftirlønarskipanina. | Eftirløn verður ikki goldin av møguligum serligum viðbótum |

**Stk. 2 Eftirløn næmingar**
Lógarásetta eftirlønargjaldið til næmingar verður goldið av arbeiðsgevara.

**Stk. 3 Arbeiðsskaðatrygging**
Umframt lógarásettu arbeiðsskaðatryggingina verða starvsfólk eisini tryggjað til og frá arbeiði.

**Stk. 4 Samlagstrygging/Bólkatrygging**
Fyritøkan teknar samlagstrygging/bólkatrygging fyri starvsfólk, sum eru limir í YTF. Onnur starvsfólk kunnu eisini tekna seg til tryggingina.

**Stk. 5 Trygging fyri hættisligum sjúkum**
Fyritøkan teknar trygging í sambandi við hættisligar sjúkur fyri starvsfólk, sum eru limir í YTF. Onnur starvsfólk kunnu eisini tekna seg til tryggingina.

**Stk. 6 Viðgerðartrygging**
Fyritøkan teknar trygging í sambandi við viðgerðartrygging fyri starvsfólk, sum eru limir í YTF. Onnur starvsfólk kunnu eisini tekna seg til tryggingina.

**Stk. 7**
Arbeiðsgevaragoldnu tryggingarnar verða skattaðar sum A-inntøka.

*Protokollat um eftirløn: Semja er um, at eftirløn hjá starvsfólki er persónlig. Arbeiðsgevari, sum bjóðar eftirlønarprodukt, miðar eftir at hetta er kappingarført, og væntað verður loyalitetur frá starvsfólki afturímóti.*

## *§6. Sjúka*

**Stk. 1. Sjúka hjá starvsfólkunum**
Er starvsfólk vegna sjúku ikki ført fyri at koma til arbeiðis, verður hetta roknað sum lóglig frávera. Er starvsfólk lógliga burtur vegna sjúku, verður goldin full løn frá fyrsta sjúkradegi, sjálvt um lógarreglur eru um karensdagar.

Galdandi er, at varir sjúkan í meiri enn 3 dagar, men færri enn 14 dagar, kann arbeiðsgevari biðja um eina váttan undir trúnaðartreyt.

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Starvsfólk, sum verður óarbeiðsført í tænastu fyri arbeiðsgevaran, undir umstøðum, sum koma undir Arbeiðsskaðatryggingarlógin, varðveita rættin til starvsplássið fram til tann dag, at fylgjurnar av tilburðinum endaliga verða ásettar, vanliga í upp til 3 ár.

**Stk. 2. Sjúka hjá børnum**
**Starvsfólk hevur rætt til frí við løn, tá ið barn/børn tess er/ eru sjúk, tó í mesta lagi í 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagið 10 dagar um árið samanlagt. Eigur starvsfólk 2 børn ella fleiri undir lógaraldur, kann tað fáa frí upp í 20 dagar um árið.**

Verður sjúkralega barnsins fleiri enn áður nevndu 2 arbeiðsdagar, kann starvsfólkið eftir umbøn, fáa farloyvi uttan løn í upp til 5 arbeiðsdagar afturat.

Verður neyðugt við longri farloyvi til ansan av sjúkum barni, kann arbeiðsgevarin játta farloyvi uttan løn móti framvísan av læknaváttan, ið arbeiðsgevarin rindar.

Verður barn innlagt á sjúkrahús og hevur tørv á hjáveru foreldranna, verður farloyvi við løn givið í upp til 8 arbeiðsdagar. Tað sama er galdandi, um barnið verður útskrivað innan 8 arbeiðsdagar og krevur framhaldandi sjúkrarøkt heima.

Verður farloyvið longur enn 8 arbeiðsdagar, kann arbeiðsgevarin játta farloyvi uttan løn móti framvísan av læknaváttan, ið arbeiðsgevarin rindar.

**Stk. 3. Ansan av doyggjandi**
Starvsfólk kann fáa farloyvi uttan løn at ansa doyggjandi.

## *§7. Frítíð og frídagar*

**Stk. 1. Frítíðarreglur**
Starvsfólk hava rætt til frítíð sambært løgtingslóg um frítíð við løn.

Harafturat er galdandi:

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Starvsfólk sum eftir áheitan frá fyritøkuni, halda summarfrí uttanfyri tíðarskeiðið 01.05. - 30.09, verður frítíðin longd við eini helvt av tí parti, ið hildin verður uttan fyri 01.05. - 30.09.

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Fyri starvsfólk í 4. lønarbólki, sum ikki fáa samsýning fyri meirarbeiði (samb. § 3, stk. 6), verður frítíðin longd við 3 frídøgum, sum skulu nýtast uttan fyri frítíðina, nevnd undir stk. 1.

**Stk. 2. Ikki innvunnin frítíð**

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Starvsfólk, sum verða sett í starv samstundis ella aftaná at frítíðarárið er byrjað, sleppa at halda ta frítíð tey eiga á, móti at lata frá sær 1/30 av mánaðarlønini fyri hvønn dag, tey halda frí. Starvsfólk, sum eftir avtalu við leiðsluna keypa sær frítíð, lata somuleiðis frá sær 1/30 av mánaðarlønini fyri hvønn dag tey halda frí.

**Stk. 3. Frítíðarviðurskifti hjá næmingi**

Næmingur hava rætt til frítíð í 25 arbeiðsdagar í tí frítíðarári (1. mai - 30 apríl), sum kemur aftaná tað frítíðarár, tá viðkomandi varð settur í starv.

Er næmingurin komin í starv fyri 1. august í einum frítíðarári, er sama galdandi hetta frítíðarárið. Næmingar, ið eru komnir í starv 1. august – 31. december, fáa 8 arbeiðsdaga frítíð hetta frítíðarárið.

**Stk 4. Eyka frítíð**
Starvsfólk, her uppií næmingar, hava, umframt tað p.t. lógarásettu frítíð, rætt til eyka frítíð sambært hesum reglum.

Starvsfólk hava rætt til 5 eyka dagar frítíð, soleiðis at tann árliga frítíðin verður tilsamans 30 (arbeiðs-)dagar.

Hesir 5 eyka dagar frítíð innvinnast stigvíst samsvarandi innvinningarárinum til frítíð soleiðis, at innvunnin verður 0,42 arbeiðsdagur fyri hvønn fullan mánað arbeitt verður.

Parttíðarsett, sum ikki arbeiða hvønn dag, og starvsfólk í farloyvi uttan løn, hava rætt til eitt lutfalsligt tal av eyka frítíðardøgum.

Hesir eyka dagar frítíð kunnu ikki haldast fyrr enn teir eru innvunnir. Við uppgerð av frítíð skal tann lógarásetta frítíðin á 25 dagar vera roknað sum hildin fyrst.

Við fráferð verður frítíðarløn bara útroknað við grundarlag í tí ikki hildnu lógarásettu frítíð á 25 (arbeiðs-)dagar. Um so er, at talið av tilgóðar frítíðardøgum við fráferð fer upp um talið av innvunnum, lógarásettum døgum til frítíð, verða avlopsdagar til frítíð samsýndir við 0,38% av tí viðkomandi ársløn.

Ikki hildnir frítíðardagar fella burtur, tá ið frítíðarárið er farið, uttan so at starvfólkið og leiðslan hava avtalað at flyta frítíðardagarnir til fylgjandi frítíðarár.

**Stk. 5. Fastir frídagar**

Jólaaftan, nýggjársaftan, flaggdagur, Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudagur og Grundlógardagur.

**Halgidagar.**
Allir halgidagar eru frídagar.

## *§8. Barnsburðarfarloyvi og ættleiðing*

**Stk 1. Barnsburðarfarloyvi**
Treytirnar í sambandi við barbsburð og ættleiðing verða ásettar í løgtingslóg nr 48 frá 3. apríl 2001 við møguligum seinni broytingum.
Undir fráveru sambært omanfyri nevndu lóg verður veitt starvsfólkunum full løn uttan miss í lønaraldri.
Møguleiki er at avtala longri farloyvi uttan løn.

**Stk. 2. Ættleiðing**
Eru tjóðskaparlig krøv um hjáveru innan ættleiðing frá ávísum londum hevur starvsfólk rætt til farloyvi í ásettu tíðina, uttan miss í lønaraldri. Tó eru upp til 4 vikur við fullari løn.

## *§9. Farloyvi*

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Starvsfólki kann verða givin tænastufrí uttan løn, har tað ikki stríðir móti arbeiðsgevarans áhugamálum.

Um so er, at ein fær farloyvi í sambandi við útbúgving, ið tænir áhugamálum arbeiðsgevarans, kann starvsfólki verða givið frí við løn ella niðursettari løn við óbroyttum eftirlønargjaldi.

Tænastufrí kann verða givin í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár, og hevur viðkomandi arbeiðsgevari skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá tænastufrítíðin er av.

Tó skulu starvsfólk, ið hava starvast longur enn 5 ár, so vítt gjørligt altíð hava rætt til minst 1 ára tænastufrí.

## *§10. Flytiendurgjald / Fyribils tænasta í hægri starvi*

**Stk. 1. Flytiendurgjald**
Hevur arbeiðsgevarin givið boð um starvsflyting í aðra bygd/kommunu, og starvsflytingin ikki er í sambandi við útnevnan til hægri starv, endurrindar arbeiðsgevarin skjalprógvaðar útreiðslur í sambandi við flyting av leysafæ v.m.

Verður starvsfólk flutt, rindar arbeiðsgevarin eftir nærri avtalu neyðugu ferðaútreiðslurnar, mat og vistarhald sambært almennu reglunum um tænastuferðir í einum tíðarskeiði svarandi til uppsagnartíðina.

**Stk. 2. Fyribils tænasta í hægri starvi**
Starvsfólk, sum fyribils røkja hægri starv í 1 viku samfelt ella meira, verða í hesum tíðarskeiði lønt við somu løn, sum tey høvdu fingið, um tey vórðu sett í starvið.
Tað áliggur deildarleiðarunum at kunna lønardeildina og starvsfólkið um broyttu lønina.

## *§11. Tænastuferðir*

**Stk. 1. Ferðingartíð**
Tá starvsfólk verður boðsent til arbeiðis aðrastaðni enn á tí vanliga arbeiðsstaðnum, verður ferðingartíðin, í tann mun hon er longri enn tann tíð, tað tekur starvsfólki at koma til vanliga arbeiðsstaðið, roknað sum arbeiðstíð. Yvirtíð verður ikki roknað av ferðingartíðini. Ferðingartíðin millum tvey arbeiðsstøð í vanligari arbeiðstíð verður roknað upp í vanligu arbeiðstíðina.

**Stk. 2. Koyring í egnum bili**
Fyri koyring í egnum bili verður latin samsýning eftir reglum, ið galda fyri tænastumenn. Starvsfólk, ið noyðast at koyra nógv, fáa avtalu við fyritøkuna um aðra samsýning.

**Stk. 3. Tænastuferðir**
Fyri tænastuferðir innanlands og uttanlands verður avroknað sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins og eftir "Vegleiðing fyri ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands".

**Stk. 4. Takstir í sambandi við útbúgving og eftirútbúgving**
Fyri útbúgving og eftirútbúgving verður avroknað sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins og eftir "Vegleiðing fyri ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands".

## *§12. Útbúgving*

**Stk. 1. Fíggjarútbúgving**
Næmingatíðin er 2 ár fyri næmingar, sum hava tikið eina miðnámsútbúgving.

3 teir fyrstu mánaðirnir av næmingatíðini eru at rokna sum sínámillum royndartíð.

Arbeiðsgevarin og næmingurin kunnu krevja starvsavtaluna sagda upp við 1 mánaða ávaring at fara úr gildi í seinasta lagi, tá royndartíðin er liðug.

Hevur næmingur verið burturstaddur í meira enn 10% av ásettu næmingatíðini orsakað av drúgvari sjúku, graviditeti, barnsburði ella ættleiðing, kann næmingatíðin verða longd við tí tíðarskeiði, lærlingurin/næmingurin hevur verið burturstaddur.

Verður næmingatíðin longd, verður hetta at fráboða næminginum skrivliga so skjótt sum gjørligt, tó seinast 3 mánaðir eftir at støðan gjørdist aktuell, og áðrenn næmingatíðin er úti.

Við setanina verður skrivaður næmingasáttmáli, sum, í tráð við henda sáttmála, m.a. inniheldur lønar- og útbúgvingarviðurskifti í næmingatíðini.

Tíðin, ið næmingurin er í skúla í sambandi við Fíggjarskúlan í vanligari arbeiðstíð og ferðing í ella úr skúla í vanligari arbeiðstíð, verður roknað sum arbeiðstíð. Arbeiðsgevarin kann ikki mótrokna ferðingatíð millum arbeiðið og skúla, fríkorter, mattíðir ella møguligar frítímar í skúlanum, í arbeiðstíðini.
Tá næmingatíðin er av, fær næmingurin útbúgvingarprógv.

**Stk. 2. Skrivstovuúbúgving**
Víst verður til løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 við seinni broytingum.

**Stk. 3. Starvsfólk annars**
Við atliti til støðugt at menna førleikan hjá starvsfólkinum innan yrkið, vil arbeiðsgevarin stuðla starvsfólkinum við viðkomandi - ástøðiligari útbúgvning.

Útbúgvingarspurningurin skal takast upp við hvørt starvsfólk sær einaferð árliga í sambandi við starvsfólkasamrøðu.

**Stk. 4. Luttøka í fundar- og skeiðtiltøkum**
Skeið, sum starvsfólk eru biðin um at taka lut í, verða roknað upp í arbeiðstíðina. Undantikin eru bert internatskeið, ið verða hildin mánadag - fríggjadag, og verður bert normaltímatalið íroknað fyri fulltíðarsett.

Um álagt verður starvsfólki at taka lut í internatskeiðum í Føroyum, ið verða hildin leygardag - sunnudag, verða tey at rokna sum 2 frígongudagar fyri hvønn skeiðdag.

Fyritøkan rindar ferðaútreiðslur aftur og fram. Er talan um skeið uttanlands, verða hesi samsýnd eftir "Vegleiðing fyri ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands" millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins.

## *§13. Álitisfólk og samstarvsnevnd*

Starvsfólk kunnu velja álitisfólk og samstarvsnevnd sambært skjølunum 3 og 4.

## *§14. Nevndarlimir og útbúgvingargrunnur*

**Stk. 1 Nevndarlimir í YTF**
Nevndarlimir og varalimir í YTF hava rætt til í arbeiðstíðini at luttaka á skeiðum í sambandi við yrkisfelagsarbeiði, tó í mesta lagi 1 viku í miðal árliga.

Loyvi krevst frá fyritøkuni í hvørjum einstøkum føri.

**Stk. 2 Útbúgvingargrunnur**

**Galdandi fyri peningarstovnar:**
Fyritøkan letur styrk til útbúgvingargrunn YTF við hesum upphæddum fyri hvørt starvsfólk:

Fulltíðarsett: kr. 300 um hálvárið
Parttíðarsett: kr. 150 um hálvárið,

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Til útbúgvingargrunnin lata tryggingarfeløgini 2,5% av 1/12 av útgoldnu lønunum árið fyri, og verður gjaldið flutt felagnum síðst í juni mánaði.

Styrkurin verður goldin frammanundan hvørt hálvár tann 1. juli og 1. januar roknaður eftir starvsfólkatalinum sama dag.

YTF bindur seg til at geva FAG árligan roknskap yvir, hvussu upphæddin í útbúgvingargrunninum
verður nýtt.

## *§15. Eftirsitiløn*

Tá ið starvsfólk, ið er lønt eftit hesum sáttmála, doyr, meðan tað er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/samlivari ella børn undir 18 ár, sum tað hevði skyldu til at uppihalda, rætt til løn í mun til uppsagnarfreistina, minst 3 mánaðir.

Eftirsitilønin er tann løn, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá starvsfólkið doyði, verður ikki roknað uppí eftirsitilønina.

## *§16. Úr starvi*

**Stk. 1. uppsøgn**
Víst verður til álitismannaskipanina §6 stk. 4.

Í sambandi við uppsagnir og uppsagnarfreistir er Løgtingslóg nr. 13 frá 20 mars 1958 við seinni broytingum galdandi. Tó kann uppsøgn ikki verða givin sambært §5, 2. Stk. í somu lóg.

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Tá skrivlig ávarin verður givin, verður avrit sent til álitisfólkið. Ávaringin skal innihalda eina frágreiðing av teim viðurskiftum, sum ávaringin er grundað á, og eina ávísing av teim krøvum, starvsfólkiå skal lúka fyri at fylgja ávaringini.

Starvsfólkið skal kvitta fyri móttøku av ávaringini, og hevur rætt til skrivlilga at gera viðmerkingar innan 7 dagar.

**Galdandi fyri tryggingarfeløgini:**
Um so er, at starvsfólk eftir leiðslunar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur starvsfólkið í fyrstu syftu at fáa eina munnliga ávaring. Tá ávaring verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt.

Eftir hesa munnligu ávaring hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, sum avtalað millum starvsfólkið, álitisfólkið og viðkomandi starvspláss, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi við nágreiniligari grundgeving.

Tá skrivlig ávaring verður givin, verður avrit sent til álitisfólkið. Ávaringin skal innihalda eina frágreiðing av teimum viðurskiftum, sum

ávaringin er grundað á, og eina ávísing av teimum krøvum, starvsfólkið skal lúka fyri at fylgja ávaringini. Starvsfólkið skal kvitta fyti móttøku av ávaringini, og hevur rætt til skrivlliga at gera viðmerkingar innan 7 dagar.

Er talan um hópuppsagnir, tað vil siga 10% av starvsfólkahópinum ella fleiri, tó í minsta lagi 3 fólk har 10% er færri enn 3, hevur fyritøkan skyldu til at kunna YTF um hetta. Er talan um 10 ella fleiri starvsfólk, skal YTF altíð kunnast um hetta.

YTF kann tá, eftir egnum ynski, samráðast um hetta við leiðsluna, áðrenn uppsagnirnar fara fram. Fyritøkan hevur skyldu til at útseta avgerð sína um uppsagnir í upp til fýra v ikur, eftir at felagið hevur fingið kunningina.

Tá starvsfólk verða søgd úr starvi, og hetta ikki er grundað á teirra egnu viðurskifti, skal viðgerð fara fram millum YTF og leiðsluna um tiltøk/átøk fyri at tryggja, at starvsfólkið fær bestu møguleikar fyri framtíðarstarvi aðrastaðni.

Omanfyri standandi er ikki galdandi, um starvsfólk hevur framt grovt misbrot í tænastuni.

Áðrenn uppsøgn uttan umsókn verður givin, skal arbeiðsgevarin fyrst senda felagnum fráboðan.

Uppsøgd starvsfólk eiga fulla løn í uppsagnartíðini.

Arbeiðsgevarin kann, eftir umstøðunum, sleppa uppsøgdum starvsfólki undan at møta til arbeiðis.

**Stk. 2. Fráfaringarendurgjald**
Starvsfólk í aldrinum 40 til pensjónsaldur, sum verða søgd úr starvi og hava verið í starvi í fyritøkuni uttan steðg í 12 ár, fáa serstakt endurgjald soleiðis:

| | |
|---|---|
| Fylt 40 ár: | 1 mánaðarløn |
| Yvir 45 ár: | 2 mánaðarlønir |
| Yvir 50 ár: | 4 mánaðarlønir |
| Yvir 55 ár: | 5 mánaðarlønir. |

**Galdandi fyri peningastovnarnar:**
Fráfaringarendurgjald verður eisini útgoldið starvsfólki, sum hevur havt minst 2 setanarskeið í fyritøkuni, har tey síðstu tilsamans eru minst 12 ár og núverandi setanarskeið er minst 6 ár.

Verður starvsfólkið uppsagt, sum er sett niður í løn innanfyri seinastu 6 mánaðarnar, skal ein møgulig fráfaringarsamsýning roknast av lønini áðrenn lønarlækkingina.

Endurgjaldið er eftirlønargevandi.

**Stk. 3. Lønarlækking / Bygnaðarbroytingar**

Um arbeiðsgevarin gevur starvsfólki í boði annað/broytt starv enn tað, viðkomandi røkir, og starvsfólkið ber seg undan, má hetta ongantíð tulkast sum uppsøgn frá starvsfólkinum.

Tekur starvsfólkið av øðrum starvi, varðveitir tað uppsagnarfreistina og starvsaldurin frá fyrra starvinum í tí nýggja starvinum.

Tekur starvsfólkið av øðrum lægri starvi, varðveitir starvsfólkið fráfaringarendurgjaldsupphæddina roknað út frá tí fyrra starvinum, við teimum hækkingum starvið verður fyri, um starvsfólkið verður sagt úr starvi innan 6 mánaðir aftaná skiftið.

| **Galdandi fyri peningastovnarnar** | **Galdandi fyri tryggingarfeløgini**<br>Eingin kann verða settur niður í løn, lønarlækking kemur ikki fyri. |
|---|---|

**Stk. 4. Uppsøgn av álitisfólki**
Víst verður til álitisfólkaavtaluna.

## *§17. Gildiskoma og endi sáttmálans*

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. mai 2015

Sáttmálin kann sigast upp við 4 mánaða fráboðan at fara úr gildi til ein 1. mai, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi 1. mai 2017.

Tórshavn tann 26. mars 2015

| **Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag** | **Fyri YTF** |
|---|---|
| Marita Rasmussen, samráðingarleiðari | Fróði Danielsen, formaður |

# 2. Kapittul: Lønir og flokkingar

## *2a. Lønir og flokkingar av peningastovnunum*

**Stk. 1 Ávísing av løn**
Lønin fyri ymsu bólkarnar verður ásett eftir niðanfyri nevndu reglum.
Lønin verður forútgoldin í seinasta lagi síðsta arbeiðsdag í undanfarna mánaði.
Avloysarar verða løntir afturút hvønn mánað, og lønin verður ávíst í seinasta lagi síðsta dag í mánaðinum.

**Stk. 2 Tímaløn**
Tímalønin verður roknað soleiðis:

$$\frac{\text{Mánaðarløn} * 12}{52 * \text{vikuarbeiðstíð}}$$

**Stk. 3 Næmingar**
Fyri næmingar verður lønin soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| <u>1. mai 2013</u>: | | |
| 1. árið | Kr.151.056 um árið | Kr. 12.588 um mánaðin |
| 2. árið | Kr.167.840 um árið | Kr. 13.987 um mánaðin |
| | | |
| <u>1.mai 2014</u> | | |
| 1. árið | Kr. 153.488 um árið | Kr. 12.791 um mánaðin |
| 2. árið | Kr. 170.542 um árið | Kr. 14.212 um mánaðin |

Lønin verður javnað við teimum vanligum sáttmálajavningunum. Starvsaldursviðbót verður latin ársdagin fyri starvssetan næmingsins.

Kann ein næmingur ikki fara til próvtøku fyrr enn eftir, at næmingatíðin er lokin, verður hann tó fluttur upp í 1. lønarflokk, tá ið næmingatíðin er lokin. Treyt fyri at verða verandi í hesum lønarflokki er, at próvtøkan verður staðin til vanliga tíð. Um próvtøka frá Fíggjarskúlanum ikki verður staðin, verður viðkomandi starvsfólk lønt í skrivstovuassistentalønarflokki 1.

**Stk. 4 Fyribils sett og avloysarar**
Fyribils sett starvsfólk og avloysarar verða teir fyrstu 3 mánaðirnir løntir minst ájavnt við "Skrivstovuassistentalønarflokki I" ár 1, tó starvsfólk við sparikassa- ella bankaútbúgving minst ájavnt við "1. lønarflokki: Sparikassaassistentar" ár 3.

Tá ið 3 mánaðir eru farnir, verður starvsfólkið fevnt av ásetingunum í sáttmálanum undantikið ásetingunum um eftirløn, sum ikki taka við fyrr enn starvsfólkið hevur verið í starvi í 12 mánaðir, smb. grein 5 í sáttmálanum.

**Stk. 5 Sparikassaassistentar – 1. lønarflokkur**
Starvsfólk, ið hava lokið peningastovnsútbúgving, verða sett í lønarflokk 1, ár 3.

**Stk. 6 Sparikassaassistentar - 2. lønarflokkur**
Við setan í 2. lønarflokk kann, um so er, at 2 ella fleiri stig eru veitt sambært stk. 10, verður sæð burtur frá seinast vunna stigi.

Lønarflokkingin verður henda:

| 1. lønarflokkur | 2. lønarflokkur |
|---|---|
| Ár | Ár |
| 1. - 3. | 1. |
| 4. | 2. |
| 5. | 3. |
| 6. - 7. | 4. |
| 8. | 5. |
| 9. | 6. |
| 10. | 7. |
| 11. - 12. | 8. |
| 13. | 9. |

**Stk. 7 Skrivstovuassistentaflokkur 1**
Upp í starvsaldurin verður talt undanfarið skrivstovuyrki – íroknað útbúgving á handilsdagskúla upp í 2 ár – rundað uppeftir til heilt tal av mánaðum. Aldursviðbót í starvi í sparikassa ella banka skal tó altíð verða tald við.

Skrivstovuassistentar kunnu fáa bjóðað at taka Fíggjarskúlan. Eftir at hava lokið peningastovnsútbúgving, verður avvarðandi skrivstovuassistentur settur í 1. lønarflokk sambært. stk. 12.

**Stk. 8 Skrivstovuassistentaflokkur 2**
Skal skrivstovuassistentur lønast eftir hesum lønarflokki frá setanardegnum, verður lønin á tí lønarstigi, ið liggur beint oman fyri ta løn, hann hevði fingið, um hann/hon varð lønt/ur eftir skrivstovuassistentarflokki I.

Skrivstovuassistentar kunnu fáa bjóða at taka Fíggjarskúlan. Eftir at hava lokið peningastovnsútbúgving, verður avvarðandi skrivstovuassistentur settur í 1. lønarflokk sambært. stk. 12.

**Stk. 9 Umsjónarmenn**
Undanfarin og viðkomandi størv eftir 20 ára aldur verða tald upp í starvsaldurin, tó við í mesta lagi 6 árum. Verður starsbúni kravdur, skal sparikassin gjalda hann.

**Stk. 10 Útbúgvingarískoyti**
Tey starvsfólk, sum hava lokið Akademisk Finansiel Uddannelse (AFR) og HD, fáa eitt árligt eftirlønargevandi ískoyti (fyrr nevndar: SVK, Bankaskúla2, Finansdiplom, Finansiel Videreuddannelse, Akademiútbúgving í fíggjarligari ráðgeving og HD), stórt kr. 14.979 pr. 01.05.2015 og kr. 15.316 pr. 01.05.2016. Ískoytið skal verða útgoldið 1. í komandi mánað eftir útbúgvingina og skal verða latið afturat mánaðarlønini við 1/12 hvørja ferð.

Starvsfólk, sum hava lokið merkonomútbúgving innan 1. maj 2001 ella eru tilmeldaði merkonomútbúgvingina pr. 1. maj 2001, og sum ikki koma undir útbúgvingaríkoytið omanfyri, fáa eisini útbúgvingaríkoyti, stórt kr.  13.850 pr 01.05.2015 og kr. 14.161 pr 01.05.2016, eftir lokna útbúgving. Tó skal útbúgvingin verða liðug í seinasta lagi 1. august 2006Hetta er galdandi fyri starvsfólk í 1., 2. og 3. lønarflokki.

Upphæddirnar verða javnaðar sambært árligu lønarhækkingunum.

**Stk. 11 Persónsviðbøtur**
Afturat endaløn kunnu, eftir arbeiðsgevarans avgerð, veitast eftirlønargevandi persónsviðbøtur upp til hesar árligu upphæddir:

Galdandi frá 1. mai 2015

| Lønarflokkur: | Afturat ársløn | Afturat mánaðarløn |
|---|---|---|
| 1. lønarflokkur | kr. 12.980 | kr. 1.082 |
| 2. lønarflokkur | kr. 12.980 | kr. 1.082 |
| 3. lønarflokkur | kr. 12.980 | kr. 1.082 |
| 4. lønarflokkur | kr. 23.520 | kr. 1.960 |
| 5. lønarflokkur | kr. 31.354 | kr. 2.613 |
| 6. lønarflokkur | kr. 62.922 | kr. 5.243 |
| Umsjónarmenn | kr. 18.822 | kr. 1.568 |
| Skrivstovuassistentar, lønarfl. I | kr. 12.980 | kr. 1.082 |
| Skrivstovuassistentar, lønarfl. II | kr. 18.822 | kr. 1.568 |

Galdandi frá 1. mai 2016

| Lønarflokkur: | Afturat ársløn | Afturat mánaðarløn |
|---|---|---|
| 1. lønarflokkur | kr. 13.272 | kr. 1.106 |
| 2. lønarflokkur | kr. 13.272 | kr. 1.106 |
| 3. lønarflokkur | kr. 13.272 | kr. 1.106 |
| 4. lønarflokkur | kr. 24.050 | kr. 2.004 |
| 5. lønarflokkur | kr. 32.059 | kr. 2.672 |
| 6. lønarflokkur | kr. 64.337 | kr. 5.361 |
| Umsjónarmenn | kr. 19.245 | kr. 1.604 |
| Skrivstovuassistentar, lønarfl. I | kr. 13.272 | kr. 1.106 |
| Skrivstovuassistentar, lønarfl. II | kr. 19.245 | kr. 1.604 |

Upphæddirnar verða javnaðar sambært árligu lønarhækkingunum.

**Stk. 12 Persónligar viðbøtur, ið ikki geva eftirløn**

Eftir avgerð arbeiðsgevarans kunnu persónligar viðbøtur, ið ikki geva eftirløn, verða veittar starvsfólki, ið leggja serligt avrik úr hondum í upp til 2 ár, og eisini í teimum førum, tá ið starvsfólkið røkir hægri starv í upp til 1 ár.
Tílíkar viðbøtur kunnu verða útgoldnar í einum ella verða lagdar afturat mánðarlønini.

**Stk. 13 Skipan í lønarflokkar & stighækkan**
Eik Banki/sparikassin tekur sjálvur avgerð um, í hvønn lønarflokk starvsfólkini skulu skipast. Stighækkanir umframt starvsaldurshækkanir kunnu fara fram.

**Stk. 14 Starvsaldur**
Starvsaldursviðbót verður latin ársdagin fyri starvssetan, tó aftaná framflyting, ársdagin fyri framflytingina.
Við starvsaldur er at skilja tað tíðarskeið, starvsfólk samanlagt hevur arbeitt innan starvsøkið. Starvsaldurin verður roknaður soleiðis, at undanfarin størv innan við¬komandi starvsøkið verða tald upp í starvsaldurin við at runda starvstíðina upp til heilt mánaðartal.

**Stk. 15 Lønarflokkingarreglur við framflutningi**
Við framflutning til hægri lønarflokk - tó ikki tá talan er um framflutning frá 1. til 2. lønarflokk, sambært stk. 3, galda hesar reglur:

Lønarhækkanin skal svara til minst 2 tær seinastu starvsaldursviðbøturnar. Fellur framflutningurin saman við tí degi sum starvsaldurshækkan annars skuldi farið fram, verður viðbótin hendan dagin roknað sum seinast veitta starvsaldursviðbótin.

Lønarhækkanin verður annars roknað við teimum lønum sum grundarlag, sum galda, tá ið framflutningurin fer fram, tá ið sæð verður burtur frá viðbótum, ið verða latnar sambært stk. 9.

Verður lønin hækkað við 2 ella fleiri stigum sambært stk. 10, kann harumframt verða sæð burtur frá seinast innvunna lønarstignum. Lønin verður tá ásett á tí lønarstigi, ið liggur beint oman fyri í tí nýggja lønarflokkinum, tó ikki hægri enn endaløn í hesum lønarflokki.

## *2b Lønartalva peningastovnarnir galdandi frá 1. mai 2015*

**Skrivstovuassistentalønarfl. 1**

| År | Årsløn | Mðr. Løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðlsur arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 219.514,10 | 18.292,84 | 3.292,71 | 21.585,55 |
| 2 | 224.681,27 | 18.723,44 | 3.370,22 | 22.093,66 |
| 3 | 229.851,14 | 19.154,26 | 3.447,77 | 22.602,03 |
| 4 | 234.162,06 | 19.513,51 | 3.512,43 | 23.025,94 |
| 5 | 238.470,28 | 19.872,52 | 3.577,05 | 23.449,58 |
| 6 | 242.778,51 | 20.231,54 | 3.641,68 | 23.873,22 |
| 7 | 247.086,73 | 20.590,56 | 3.706,30 | 24.296,86 |
| 8 | 251.394,95 | 20.949,58 | 3.770,92 | 24.720,50 |
| 9 | 255.704,53 | 21.308,71 | 3.835,57 | 25.144,28 |
| 10 | 260.011,40 | 21.667,62 | 3.900,17 | 25.567,79 |
| 11 | 264.320,97 | 22.026,75 | 3.964,81 | 25.991,56 |
| 12 | 268.629,20 | 22.385,77 | 4.029,44 | 26.415,20 |
| 13 | 272.936,07 | 22.744,67 | 4.094,04 | 26.838,71 |
| 14 | 277.246,99 | 23.103,92 | 4.158,70 | 27.262,62 |
| 15 | 281.625,45 | 23.468,79 | 4.224,38 | 27.693,17 |

**Skrivstovuassistentafl. 2**

| År | Årsløn | Mðr. Løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðlsur arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 233.978,39 | 19.498,20 | 3.509,68 | 23.007,87 |
| 2 | 241.631,90 | 20.135,99 | 3.624,48 | 23.760,47 |
| 3 | 249.292,16 | 20.774,35 | 3.739,38 | 24.513,73 |
| 4 | 256.701,23 | 21.391,77 | 3.850,52 | 25.242,29 |
| 5 | 264.611,34 | 22.050,95 | 3.969,17 | 26.020,12 |
| 6 | 272.019,05 | 22.668,25 | 4.080,29 | 26.748,54 |
| 7 | 279.676,62 | 23.306,38 | 4.195,15 | 27.501,53 |
| 8 | 287.089,73 | 23.924,14 | 4.306,35 | 28.230,49 |
| 9 | 294.487,99 | 24.540,67 | 4.417,32 | 28.957,99 |
| 10 | 302.403,51 | 25.200,29 | 4.536,05 | 29.736,34 |
| 11 | 310.061,07 | 25.838,42 | 4.650,92 | 30.489,34 |
| 12 | 317.914,46 | 26.492,87 | 4.768,72 | 31.261,59 |

**Umsjónarmaður**

| År | Årsløn | Mðr. Løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðlsur arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 230.341,38 | 19.195,12 | 3.455,12 | 22.650,24 |
| 2 | 235.947,48 | 19.662,29 | 3.539,21 | 23.201,50 |
| 3 | 241.552,22 | 20.129,35 | 3.623,28 | 23.752,63 |
| 4 | 247.159,66 | 20.596,64 | 3.707,39 | 24.304,03 |
| 5 | 252.764,40 | 21.063,70 | 3.791,47 | 24.855,17 |
| 6 | 258.373,20 | 21.531,10 | 3.875,60 | 25.406,70 |
| 7 | 263.975,24 | 21.997,94 | 3.959,63 | 25.957,56 |
| 8 | 268.648,11 | 22.387,34 | 4.029,72 | 26.417,06 |
| 9 | 273.322,33 | 22.776,86 | 4.099,83 | 26.876,70 |
| 10 | 278.147,81 | 23.178,98 | 4.172,22 | 27.351,20 |
| 11 | 283.504,05 | 23.625,34 | 4.252,56 | 27.877,90 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12 | 289.634,15 | 24.136,18 | 4.344,51 | 28.480,69 |
| 13 | 296.787,96 | 24.732,33 | 4.451,82 | 29.184,15 |
| 14 | 304.121,39 | 25.343,45 | 4.561,82 | 29.905,27 |

**1. Lønarflokkur**

| Ár | Årsløn | Mðr.løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðlsur arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 243.640,15 | 20.303,35 | 3.654,60 | 23.957,95 |
| 2 | 255.704,53 | 21.308,71 | 3.835,57 | 25.144,28 |
| 3 | 268.082,43 | 22.340,20 | 4.021,24 | 26.361,44 |
| 4 | 272.376,00 | 22.698,00 | 4.085,64 | 26.783,64 |
| 5 | 277.057,92 | 23.088,16 | 4.155,87 | 27.244,03 |
| 6 | 280.794,86 | 23.399,57 | 4.211,92 | 27.611,49 |
| 7 | 284.534,51 | 23.711,21 | 4.268,02 | 27.979,23 |
| 8 | 287.338,23 | 23.944,85 | 4.310,07 | 28.254,93 |
| 9 | 289.896,15 | 24.158,01 | 4.348,44 | 28.506,46 |
| 10 | 297.033,76 | 24.752,81 | 4.455,51 | 29.208,32 |
| 11 | 304.954,68 | 25.412,89 | 4.574,32 | 29.987,21 |
| 12 | 313.378,00 | 26.114,83 | 4.700,67 | 30.815,50 |
| 13 | 322.036,31 | 26.836,36 | 4.830,54 | 31.666,90 |

**2. Lønarflokkur**

| Ár | Ársløn | Mðr.løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðlsur arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 278.759,27 | 23.229,94 | 4.181,39 | 27.411,33 |
| 2 | 287.920,33 | 23.993,36 | 4.318,80 | 28.312,17 |
| 3 | 297.357,92 | 24.779,83 | 4.460,37 | 29.240,20 |
| 4 | 307.055,61 | 25.587,97 | 4.605,83 | 30.193,80 |
| 5 | 316.487,72 | 26.373,98 | 4.747,32 | 31.121,29 |
| 6 | 325.655,62 | 27.137,97 | 4.884,83 | 32.022,80 |
| 7 | 335.628,47 | 27.969,04 | 5.034,43 | 33.003,47 |
| 8 | 344.792,27 | 28.732,69 | 5.171,88 | 33.904,57 |
| 9 | 357.017,05 | 29.751,42 | 5.355,26 | 35.106,68 |
| 10 | 369.675,79 | 30.806,32 | 5.545,14 | 36.351,45 |

**3. Lønarflokkur**

| Ár | Ársløn | Mðr.løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðsla arb.gev. |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 317.573,30 | 26.464,44 | 4.763,60 | 31.228,04 |
| 2 | 328.081,41 | 27.340,12 | 4.921,22 | 32.261,34 |
| 3 | 338.866,05 | 28.238,84 | 5.082,99 | 33.321,83 |
| 4 | 349.367,32 | 29.113,94 | 5.240,51 | 34.354,45 |
| 5 | 360.421,65 | 30.035,14 | 5.406,32 | 35.441,46 |
| 6 | 370.661,44 | 30.888,45 | 5.559,92 | 36.448,38 |
| 7 | 381.719,87 | 31.809,99 | 5.725,80 | 37.535,79 |
| 8 | 392.223,88 | 32.685,32 | 5.883,36 | 38.568,68 |
| 9 | 403.278,20 | 33.606,52 | 6.049,17 | 39.655,69 |
| 10 | 414.646,02 | 34.553,83 | 6.219,69 | 40.773,53 |

**4. Lønarflokkur**

| Ár | Ársløn | Mðr.løn | Arb.gev. eftirløn 18% | Útreiðsla arb.gev |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 386.294,93 | 32.191,24 | 5.794,42 | 37.985,67 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2 | 394.926,20 | 32.910,52 | 5.923,89 | 38.834,41 |
| 3 | 405.430,20 | 33.785,85 | 6.081,45 | 39.867,30 |
| 4 | 414.867,79 | 34.572,32 | 6.223,02 | 40.795,33 |
| 5 | 424.837,90 | 35.403,16 | 6.372,57 | 41.775,73 |
| 6 | 434.275,49 | 36.189,62 | 6.514,13 | 42.703,76 |
| 7 | 444.515,28 | 37.042,94 | 6.667,73 | 43.710,67 |
| 8 | 454.484,03 | 37.873,67 | 6.817,26 | 44.690,93 |
| 9 | 464.677,28 | 38.723,11 | 6.970,16 | 45.693,27 |

| 5. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 432.190,49 | 36.015,87 | 6.482,86 | 42.498,73 |
| 2 | 441.752,45 | 36.812,70 | 6.626,29 | 43.438,99 |
| 3 | 452.401,86 | 37.700,15 | 6.786,03 | 44.486,18 |
| 4 | 462.239,85 | 38.519,99 | 6.933,60 | 45.453,59 |
| 5 | 472.347,62 | 39.362,30 | 7.085,21 | 46.447,52 |
| 6 | 482.178,32 | 40.181,53 | 7.232,67 | 47.414,20 |
| 7 | 492.831,90 | 41.069,32 | 7.392,48 | 48.461,80 |
| 8 | 502.664,68 | 41.888,72 | 7.539,97 | 49.428,69 |
| 9 | 512.775,58 | 42.731,30 | 7.691,63 | 50.422,93 |
| 10 | 522.601,07 | 43.550,09 | 7.839,02 | 51.389,11 |
| 11 | 532.986,95 | 44.415,58 | 7.994,80 | 52.410,38 |
| 12 | 545.548,75 | 45.462,40 | 8.183,23 | 53.645,63 |
| 13 | 558.935,50 | 46.577,96 | 8.384,03 | 54.961,99 |
| 14 | 572.650,36 | 47.720,86 | 8.589,76 | 56.310,62 |

| 6. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 489.007,40 | 40.750,62 | 7.335,11 | 48.085,73 |
| 2 | 509.221,43 | 42.435,12 | 7.638,32 | 50.073,44 |
| 3 | 529.432,68 | 44.119,39 | 7.941,49 | 52.060,88 |
| 4 | 549.917,24 | 45.826,44 | 8.248,76 | 54.075,20 |
| 5 | 570.405,97 | 47.533,83 | 8.556,09 | 56.089,92 |
| 6 | 590.893,31 | 49.241,11 | 8.863,40 | 58.104,51 |
| 7 | 611.375,10 | 50.947,92 | 9.170,63 | 60.118,55 |
| 8 | 632.565,83 | 52.713,82 | 9.488,49 | 62.202,31 |

## *Lønartalva peningastovnarnir galdandi frá 1. mai 2016*

| Skrivstovuassistentalønarfl. 1 | | | Arb.gev. | Útreiðlsur |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 224.453,17 | 18.704,43 | 3.366,80 | 22.071,23 |
| 2 | 229.736,60 | 19.144,72 | 3.446,05 | 22.590,77 |
| 3 | 235.022,79 | 19.585,23 | 3.525,34 | 23.110,57 |
| 4 | 239.430,71 | 19.952,56 | 3.591,46 | 23.544,02 |
| 5 | 243.835,87 | 20.319,66 | 3.657,54 | 23.977,19 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6 | 248.241,02 | 20.686,75 | 3.723,62 | 24.410,37 |
| 7 | 252.646,18 | 21.053,85 | 3.789,69 | 24.843,54 |
| 8 | 257.051,34 | 21.420,95 | 3.855,77 | 25.276,72 |
| 9 | 261.457,88 | 21.788,16 | 3.921,87 | 25.710,02 |
| 10 | 265.861,66 | 22.155,14 | 3.987,92 | 26.143,06 |
| 11 | 270.268,20 | 22.522,35 | 4.054,02 | 26.576,37 |
| 12 | 274.673,35 | 22.889,45 | 4.120,10 | 27.009,55 |
| 13 | 279.077,13 | 23.256,43 | 4.186,16 | 27.442,58 |
| 14 | 283.485,05 | 23.623,75 | 4.252,28 | 27.876,03 |
| 15 | 287.962,02 | 23.996,83 | 4.319,43 | 28.316,27 |

| Skrivstovuassistentafl. 2 | | | Arb.gev. | Útreiðlsur |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Årsløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 239.242,90 | 19.936,91 | 3.588,64 | 23.525,55 |
| 2 | 247.068,62 | 20.589,05 | 3.706,03 | 24.295,08 |
| 3 | 254.901,24 | 21.241,77 | 3.823,52 | 25.065,29 |
| 4 | 262.477,00 | 21.873,08 | 3.937,16 | 25.810,24 |
| 5 | 270.565,10 | 22.547,09 | 4.058,48 | 26.605,57 |
| 6 | 278.139,48 | 23.178,29 | 4.172,09 | 27.350,38 |
| 7 | 285.969,34 | 23.830,78 | 4.289,54 | 28.120,32 |
| 8 | 293.549,25 | 24.462,44 | 4.403,24 | 28.865,68 |
| 9 | 301.113,97 | 25.092,83 | 4.516,71 | 29.609,54 |
| 10 | 309.207,59 | 25.767,30 | 4.638,11 | 30.405,41 |
| 11 | 317.037,44 | 26.419,79 | 4.755,56 | 31.175,35 |
| 12 | 325.067,54 | 27.088,96 | 4.876,01 | 31.964,97 |

| Umsjónarmaður | | | Arb.gev. | Útreiðlsur |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Årsløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 235.524,06 | 19.627,01 | 3.532,86 | 23.159,87 |
| 2 | 241.256,29 | 20.104,69 | 3.618,84 | 23.723,54 |
| 3 | 246.987,14 | 20.582,26 | 3.704,81 | 24.287,07 |
| 4 | 252.720,75 | 21.060,06 | 3.790,81 | 24.850,87 |
| 5 | 258.451,60 | 21.537,63 | 3.876,77 | 25.414,41 |
| 6 | 264.186,59 | 22.015,55 | 3.962,80 | 25.978,35 |
| 7 | 269.914,68 | 22.492,89 | 4.048,72 | 26.541,61 |
| 8 | 274.692,69 | 22.891,06 | 4.120,39 | 27.011,45 |
| 9 | 279.472,08 | 23.289,34 | 4.192,08 | 27.481,42 |
| 10 | 284.406,13 | 23.700,51 | 4.266,09 | 27.966,60 |
| 11 | 289.882,89 | 24.156,91 | 4.348,24 | 28.505,15 |
| 12 | 296.150,92 | 24.679,24 | 4.442,26 | 29.121,51 |
| 13 | 303.465,69 | 25.288,81 | 4.551,99 | 29.840,79 |
| 14 | 310.964,13 | 25.913,68 | 4.664,46 | 30.578,14 |

| 1. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðlsur |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Årsløn | Mðr.løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 249.122,06 | 20.760,17 | 3.736,83 | 24.497,00 |
| 2 | 261.457,88 | 21.788,16 | 3.921,87 | 25.710,02 |
| 3 | 274.114,28 | 22.842,86 | 4.111,71 | 26.954,57 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4 | 278.504,46 | 23.208,71 | 4.177,57 | 27.386,27 |
| 5 | 283.291,72 | 23.607,64 | 4.249,38 | 27.857,02 |
| 6 | 287.112,75 | 23.926,06 | 4.306,69 | 28.232,75 |
| 7 | 290.936,54 | 24.244,71 | 4.364,05 | 28.608,76 |
| 8 | 293.803,34 | 24.483,61 | 4.407,05 | 28.890,66 |
| 9 | 296.418,82 | 24.701,57 | 4.446,28 | 29.147,85 |
| 10 | 303.717,02 | 25.309,75 | 4.555,76 | 29.865,51 |
| 11 | 311.816,16 | 25.984,68 | 4.677,24 | 30.661,92 |
| 12 | 320.429,00 | 26.702,42 | 4.806,44 | 31.508,85 |
| 13 | 329.282,13 | 27.440,18 | 4.939,23 | 32.379,41 |

| 2. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðlsur |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr.løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 285.031,36 | 23.752,61 | 4.275,47 | 28.028,08 |
| 2 | 294.398,54 | 24.533,21 | 4.415,98 | 28.949,19 |
| 3 | 304.048,47 | 25.337,37 | 4.560,73 | 29.898,10 |
| 4 | 313.964,36 | 26.163,70 | 4.709,47 | 30.873,16 |
| 5 | 323.608,69 | 26.967,39 | 4.854,13 | 31.821,52 |
| 6 | 332.982,87 | 27.748,57 | 4.994,74 | 32.743,32 |
| 7 | 343.180,11 | 28.598,34 | 5.147,70 | 33.746,04 |
| 8 | 352.550,09 | 29.379,17 | 5.288,25 | 34.667,43 |
| 9 | 365.049,93 | 30.420,83 | 5.475,75 | 35.896,58 |
| 10 | 377.993,50 | 31.499,46 | 5.669,90 | 37.169,36 |

| 3. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr.løn | eftirløn 18% | arb.gev. |
| 1 | 324.718,70 | 27.059,89 | 4.870,78 | 31.930,67 |
| 2 | 335.463,25 | 27.955,27 | 5.031,95 | 32.987,22 |
| 3 | 346.490,54 | 28.874,21 | 5.197,36 | 34.071,57 |
| 4 | 357.228,09 | 29.769,01 | 5.358,42 | 35.127,43 |
| 5 | 368.531,13 | 30.710,93 | 5.527,97 | 36.238,89 |
| 6 | 379.001,32 | 31.583,44 | 5.685,02 | 37.268,46 |
| 7 | 390.308,57 | 32.525,71 | 5.854,63 | 38.380,34 |
| 8 | 401.048,92 | 33.420,74 | 6.015,73 | 39.436,48 |
| 9 | 412.351,96 | 34.362,66 | 6.185,28 | 40.547,94 |
| 10 | 423.975,55 | 35.331,30 | 6.359,63 | 41.690,93 |

| 4. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr.løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 394.986,56 | 32.915,55 | 5.924,80 | 38.840,35 |
| 2 | 403.812,04 | 33.651,00 | 6.057,18 | 39.708,18 |
| 3 | 414.552,38 | 34.546,03 | 6.218,29 | 40.764,32 |
| 4 | 424.202,32 | 35.350,19 | 6.363,03 | 41.713,23 |
| 5 | 434.396,75 | 36.199,73 | 6.515,95 | 42.715,68 |
| 6 | 444.046,69 | 37.003,89 | 6.660,70 | 43.664,59 |
| 7 | 454.516,88 | 37.876,41 | 6.817,75 | 44.694,16 |
| 8 | 464.709,92 | 38.725,83 | 6.970,65 | 45.696,48 |
| 9 | 475.132,52 | 39.594,38 | 7.126,99 | 46.721,36 |

| 5. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 441.914,77 | 36.826,23 | 6.628,72 | 43.454,95 |
| 2 | 451.691,88 | 37.640,99 | 6.775,38 | 44.416,37 |
| 3 | 462.580,90 | 38.548,41 | 6.938,71 | 45.487,12 |
| 4 | 472.640,25 | 39.386,69 | 7.089,60 | 46.476,29 |
| 5 | 482.975,44 | 40.247,95 | 7.244,63 | 47.492,59 |
| 6 | 493.027,34 | 41.085,61 | 7.395,41 | 48.481,02 |
| 7 | 503.920,61 | 41.993,38 | 7.558,81 | 49.552,19 |
| 8 | 513.974,64 | 42.831,22 | 7.709,62 | 50.540,84 |
| 9 | 524.313,03 | 43.692,75 | 7.864,70 | 51.557,45 |
| 10 | 534.359,59 | 44.529,97 | 8.015,39 | 52.545,36 |
| 11 | 544.979,16 | 45.414,93 | 8.174,69 | 53.589,62 |
| 12 | 557.823,60 | 46.485,30 | 8.367,35 | 54.852,65 |
| 13 | 571.511,55 | 47.625,96 | 8.572,67 | 56.198,64 |
| 14 | 585.535,00 | 48.794,58 | 8.783,02 | 57.577,61 |

| 6. Lønarflokkur | | | Arb.gev. | Útreiðsla |
|---|---|---|---|---|
| Ár | Ársløn | Mðr. Løn | eftirløn 18% | arb.gev |
| 1 | 500.010,07 | 41.667,51 | 7.500,15 | 49.167,66 |
| 2 | 520.678,91 | 43.389,91 | 7.810,18 | 51.200,09 |
| 3 | 541.344,91 | 45.112,08 | 8.120,17 | 53.232,25 |
| 4 | 562.290,38 | 46.857,53 | 8.434,36 | 55.291,89 |
| 5 | 583.240,10 | 48.603,34 | 8.748,60 | 57.351,94 |
| 6 | 604.188,41 | 50.349,03 | 9.062,83 | 59.411,86 |
| 7 | 625.131,04 | 52.094,25 | 9.376,97 | 61.471,22 |
| 8 | 646.798,56 | 53.899,88 | 9.701,98 | 63.601,86 |

## *2c Løn og flokkingar tryggingarfeløgini*

**§ 1. Lønarviðurskifti**

**Stk. 1. Løn**
Lønin fyri ymsu bólkarnar verður ásett eftir niðanfyri nevndu reglum.

Lønin verður forútgoldin tann 25. í hvørjum mánaði.

Bert næmingar, fólk í royndartíð og fyribilssett kunna verða afturútgoldin 25. í mánaðinum.

**Stk. 2. Tímaløn**
Tímalønin verður roknað soleiðis:

$$\frac{\text{Mánaðarløn x 12}}{\text{52 x 35}}$$ *(Hetta svarar til 1820 tímar um árið)*

**Stk. 3. Flokking**

**A. Felags**
Øll starvsfólk á Tryggingarfeløgunum verða sett í ein lønarflokk og á eitt lønarstig, sum tilskilað niðanfyri. Vanliga verða starvsfólk uttan heimildir sett á 1. lønarstig í lønarflokkinum, og starvsaldurshækkingin, sum fer fram á hvørjum ári á ársdegnum fyri setanina í lønarskipanina, heldur fram til ein er á endastigi.

**B. Skrivstovufólk, telefonavgreiðsla og hjálparfólk - Lønarbólkur 1 og 2**

Skrivstovufólk - tað er fólk, sum er fylt 17 ár, men ikki hava skrivstovuútbúgving -, og hjálparfólk verða sett í lønarbólk 1 og í minsta lagi í lønarflokk 10.

Telefonavgreiðslufólk verða sett í lønarbólk 2 og í minsta lagi lønarflokk 14 stig 20.

**C. Skrivstovuassistentar - Lønarbólkur 2 og 3**

Við skrivstovuassistent er at skilja starvsfólk, sum hava staðið lærutíðina samb. næmingalógini ella fingið annað lærubræv, t.d. frá fíggjarstovni, fyri lærutíð, sum ikki má vera styttri enn 2 ár.

Hesir skrivstovuassistentar verða settir í lønarbólk 2 og 3 og í minsta lagi í lønarflokk 14 á 14. stigi.

Skrivstovuassistentar, sum hava víðari ástøðiliga útbúgving verða - um so er, at starvsøkið krevur tílíka útbúgving - lønt í minsta lagi sum starvsfólk undir G.

**D. Næmingar**

Næmingur, sum verður tikin í læru innan skrivstovu- og tryggingaryrkið, verður løntur í lutfalli av byrjunarlønini fyri tryggingarassistentar á henda hátt :

| Læruár / -tíð : | 3 | 2 | 1 |
|---|---|---|---|
| 1 : | 55% | 65% | 72% |
| 2 : | 65% | 72% | |
| 3 : | 72% | | |

Stighækkingin fer fram á ársdegnum fyri næmingasetanina.

Viðv. Næmingaútbúgvingini verður víst til § 10 í “Starvsavtala”.

**E. Tryggingarassistentar / Fíggjaratstøðingar- Lønarbólkur 2 og 3**

Við tryggingarassistentar/fíggaratstøðingar er at skilja fólk, sum hava staðið næmingatíðina, sambært § 10 í Starvsavtaluni og fyri tryggingarnæmingar tikið prógv sum samsvarar støði 3 í útbúgvingarskipanini hjá Tryggingarakedemi´num. Hesi verða sett í lønarbólk 2 og 3 og í minsta lagi í lønarflokk 16 á 20. Stigi.

Tryggingarassistentar, sum hava luttikið á og staðið tey modul á niveau 4 ella 5, sum arbeiðsgevarin metir eru neyðug fyri at røkja teirra starv, verða settir ein lønarflokk hægri enn tann flokk, viðkomandi var í, tá lønarhækking fór fram og við sama lønaraldri.

**F. Skrivarar - Lønarbólkur 3 og 4**

Við skrivarar er at skilja:
- stjórnarskrivarar

sum verða settir í lønarbólk 4 og í minsta lagi lønarflokk 31 og stig 48.
- Deildarskrivarar,

sum verða settir í lønarbólk 3 og í minsta lagi lønarflokk 27 og stig 44.

**G. Fulltrúar - Lønarbólkur 3**

Fulltrúar verða løntir í lønarbólki 3 og í minsta lagi í lønarflokki 23, stig 40.

Ein fulltrúi er starvsfólk, sum uttan at vera leiðari hevur víðari heimildir at virka undir enn ein skrivstovu-ella/tryggingarassistentur. Talan kann verða heimildir bæði av fíggjarligum og fyrisitingarligum slag.

**H. Dagligir leiðarar - Lønarbólkur 4**

Dagligur leiðari verður løntur í lønarbólki 4 og í minsta lagi í lønarflokki 31, stig 48.

**I. Deildarleiðarar**

Deildarleiðari verða løntir í lønarbólki 4 og í minsta lagi í lønarflokki 49, stig 66.

**J. Sýns- og metingarmenn - Lønarbólkur 3 og 4**

- Bilsýns- og metingarmenn
- Bygningssýns- og metingarmenn
- Skipasýns- og metingarmenn
- Aling

Fyri sýnsmenn, har útbúgvingarkrøv verða sett, verður lønin í minsta lagi at samsvara lønini fyri samsvarandi útbúgving á privata marknaðinum, t. v. s., verður søkt eftir maskinmeistara, verkfrøðingi, byggifrøðingi ella líknandi, verður lønin í avvarðandi sáttmála yvirførd til nærmasta lønarstøði í lønarsáttmála millum tryggingarfelagið og Yrkisfelagið Trygdina.

Sýns- og metingarmenn verða løntir í lønarbólki 3 og 4 og í minsta lagi í lønarflokki 23, stig 40.

Serstøk avtala verður gjørd við sýns- og metingarmenn um samsýning fyri at vera tøkur.

**K. Tryggingarráðgevarar**

Hesi lønast í minsta lagi í lønarbólki 2, flokki 13, stig 23.

Tryggingarráðgevarar kunnu bert vera persónar, ið hava staðið prógv sum exam. ráðgevar á tryggingarháskúlanum.

Persónar, sum við gildiskomu av hesum sáttmála ikki eru exam. ráðgevar, men sum virka sum ráðgevar/umboð, kunnu eftir umsókn flytast yvir til at vera umfataðir av heitinum tryggingarráðgevi.

Tryggingarráðgevar og umboð verða sett eftir serligum sáttmála fyri hvørt tryggingarfelag sær.

Verða tey, ið nevnd eru undir L, og tryggingarfelagið ikki samd um skipan av sáttmála, verður Yrkisfelagið Trygdin partur í samráðingunum.

**L. Húsavørðar**

Húsavørður verður settur eftir serligum sáttmála fyri hvørt tryggingarfelag sær. Tó skal hesin lønast í minsta lagi í lønarbólki 2, lønarflokki 16, stig 17.

**M. KT- starvsfólk – Lønarbólkur 3-4**

KT-starvsfólk verða lønt samsvarandi krøvum til starvið og annars í mun til útbúgving og royndir.

**§ 2. Lønarflokkar og lønarstig**

| **Lønarflokkur** | | **1.ár** | **2.ár** | **3.ár** | **4.ár** | **5.ár** | **6.ár** | **7.ár** | **8.ár** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | ***L*** | ***Ø*** | ***N*** | ***A*** | ***R*** | ***S*** | ***T*** | ***I*** | ***G*** |
| **1. lønarbólkur** | ***1*** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** |
| | ***2*** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** |
| | ***3*** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** |
| | ***4*** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** |
| | ***5*** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** |
| | ***6*** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** |
| | ***7*** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** |
| | ***8*** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** |
| | ***9*** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** |
| | ***10*** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** |
| | ***11*** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** |
| | ***12*** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** |

| **Lønarflokkur** | | **1.ár** | **2.ár** | **3.ár** | **4.ár** | **5.ár** | **6.ár** | **7.ár** | **8.ár** | **9.ár** | **10.ár** | **11.ár** | **12.ár** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | ***L*** | ***Ø*** | ***N*** | ***A*** | ***R*** | ***S*** | ***T*** | ***I*** | ***G*** | | | | |
| **2. lønarbólkur** | ***13*** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** |
| | ***14*** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** |
| | ***15*** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** |
| | ***16*** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** |
| | ***17*** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** |
| | ***18*** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** |
| | ***19*** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** |
| | ***20*** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** |
| | ***21*** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** |
| | ***22*** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** | **33** |

| **Lønarflokkur** | | **1.ár** | **2.ár** | **3.ár** | **4.ár** | **5.ár** | **6.ár** | **7.ár** | **8.ár** | **9.ár** | **10.ár** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | ***L*** | ***Ø*** | ***N*** | ***A*** | ***R*** | ***S*** | ***T*** | ***I*** | ***G*** | | |
| **3. lønarbólkur** | ***23*** | **40** | **41** | **42** | **43** | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** |
| | ***24*** | **41** | **42** | **43** | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *25* | **42** | **43** | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** |
| *26* | **43** | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** |
| *27* | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** |
| *28* | **45** | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** |
| *29* | **46** | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** |
| *30* | **47** | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** |

| | **Lønarflokkur** | **1.ár** | **2.ár** | **3.ár** | **4.ár** | **5.ár** | **6.ár** | **7.ár** | **8.ár** | **9.ár** | **10.ár** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | ***L*** | ***Ø*** | ***N*** | ***A*** | ***R*** | ***S*** | ***T*** | ***I*** | ***G*** | | |
| **4. lønarbólkur** | *31* | **48** | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** |
| | *32* | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** |
| | *33* | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** |
| | *34* | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** |
| | *35* | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** |
| | *36* | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** |
| | *37* | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** |
| | *38* | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** |
| | *39* | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** |
| | *40* | **57** | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** |
| | *41* | **58** | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** |
| | *42* | **59** | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** |
| | *43* | **60** | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** |
| | *44* | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** |
| | *45* | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** |
| | *46* | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** |
| | *47* | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** | **73** |
| | *48* | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** | **73** | **74** |
| | *49* | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** | **73** | **74** | **75** |
| | *50* | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** | **73** | **74** | **75** | **76** |
| | *51* | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** | **73** | **74** | **75** | **76** | **77** |

## *2d Lønartalva tryggingarfeløgini*

**Lønartalvur 1. mai 2015**

| Stig | Ársløn | Mánaðarløn | Tímaløn |
|---|---|---|---|
| 3 | 213.035 | 17.752,93 | 117,05 |
| 4 | 215.844 | 17.987,03 | 118,60 |
| 5 | 218.670 | 18.222,54 | 120,15 |
| 6 | 221.484 | 18.457,00 | 121,69 |
| 7 | 224.889 | 18.740,71 | 123,57 |
| 8 | 228.243 | 19.020,25 | 125,41 |
| 9 | 231.608 | 19.300,65 | 127,26 |
| 10 | 235.013 | 19.584,38 | 129,13 |
| 11 | 238.397 | 19.866,43 | 130,99 |
| 12 | 241.770 | 20.147,54 | 132,84 |
| 13 | 245.151 | 20.429,25 | 134,70 |
| 14 | 249.102 | 20.758,48 | 136,87 |
| 15 | 253.045 | 21.087,11 | 139,04 |
| 16 | 257.005 | 21.417,12 | 141,21 |
| 17 | 260.898 | 21.741,47 | 143,35 |
| 18 | 264.843 | 22.070,27 | 145,52 |
| 19 | 268.785 | 22.398,71 | 147,68 |
| 20 | 272.750 | 22.729,17 | 149,86 |
| 21 | 277.253 | 23.104,44 | 152,34 |
| 22 | 281.772 | 23.481,02 | 154,82 |
| 23 | 286.275 | 23.856,28 | 157,29 |
| 24 | 290.779 | 24.231,55 | 159,77 |
| 25 | 295.284 | 24.607,00 | 162,24 |
| 26 | 299.786 | 24.982,17 | 164,72 |
| 27 | 304.849 | 25.404,09 | 167,50 |
| 28 | 309.949 | 25.829,06 | 170,30 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29 | 315.006 | 26.250,54 | 173,08 |
| 30 | 320.052 | 26.670,98 | 175,85 |
| 31 | 325.118 | 27.093,15 | 178,64 |
| 32 | 330.213 | 27.517,77 | 181,44 |
| 33 | 335.852 | 27.987,64 | 184,53 |
| 40 | 316.547 | 26.378,95 | 173,93 |
| 41 | 320.851 | 26.737,62 | 176,29 |
| 42 | 325.217 | 27.101,44 | 178,69 |
| 43 | 329.645 | 27.470,42 | 181,12 |
| 44 | 334.137 | 27.844,74 | 183,59 |
| 45 | 338.691 | 28.224,28 | 186,09 |
| 46 | 343.311 | 28.609,25 | 188,63 |
| 47 | 347.998 | 28.999,80 | 191,21 |
| 48 | 352.750 | 29.395,87 | 193,82 |
| 49 | 357.571 | 29.797,60 | 196,47 |
| 50 | 362.461 | 30.205,10 | 199,15 |
| 51 | 367.419 | 30.618,28 | 201,88 |
| 52 | 372.449 | 31.037,40 | 204,64 |
| 53 | 377.550 | 31.462,46 | 207,44 |
| 54 | 382.724 | 31.893,63 | 210,29 |
| 55 | 387.972 | 32.331,01 | 213,17 |
| 56 | 393.293 | 32.774,42 | 216,10 |
| 57 | 398.690 | 33.224,19 | 219,06 |
| 58 | 404.165 | 33.680,44 | 222,07 |
| 59 | 409.720 | 34.143,33 | 225,12 |
| 60 | 415.351 | 34.612,58 | 228,21 |
| 61 | 421.066 | 35.088,84 | 231,35 |
| 62 | 426.860 | 35.571,63 | 234,54 |
| 63 | 432.736 | 36.061,34 | 237,77 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 64 | 438.695 | 36.557,94 | 241,04 |
| 65 | 444.741 | 37.061,79 | 244,36 |
| 66 | 450.872 | 37.572,63 | 247,73 |
| 67 | 457.090 | 38.090,81 | 251,15 |
| 68 | 463.398 | 38.616,50 | 254,61 |
| 69 | 469.794 | 39.149,53 | 258,13 |
| 70 | 476.282 | 39.690,15 | 261,69 |
| 71 | 482.865 | 40.238,73 | 265,31 |
| 72 | 489.538 | 40.794,82 | 268,98 |
| 73 | 496.307 | 41.358,95 | 272,70 |
| 74 | 503.175 | 41.931,28 | 276,47 |
| 75 | 510.138 | 42.511,48 | 280,30 |
| 76 | 517.201 | 43.100,07 | 284,18 |
| 77 | 524.364 | 43.697,04 | 288,11 |

**Lønartalvur 1. mai 2016**

| Stig | Ársløn | Mánaðarløn | Tímaløn |
|---|---|---|---|
| 3 | 217.828 | 18.152,37 | 119,69 |
| 4 | 220.701 | 18.391,74 | 121,26 |
| 5 | 223.591 | 18.632,55 | 122,85 |
| 6 | 226.467 | 18.872,28 | 124,43 |
| 7 | 229.949 | 19.162,38 | 126,35 |
| 8 | 233.378 | 19.448,20 | 128,23 |
| 9 | 236.819 | 19.734,91 | 130,12 |
| 10 | 240.300 | 20.025,02 | 132,03 |
| 11 | 243.761 | 20.313,43 | 133,93 |
| 12 | 247.210 | 20.600,86 | 135,83 |
| 13 | 250.667 | 20.888,91 | 137,73 |
| 14 | 254.707 | 21.225,55 | 139,95 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15 | 258.739 | 21.561,57 | 142,16 |
| 16 | 262.788 | 21.899,01 | 144,39 |
| 17 | 266.768 | 22.230,65 | 146,58 |
| 18 | 270.802 | 22.566,85 | 148,79 |
| 19 | 274.832 | 22.902,68 | 151,01 |
| 20 | 278.887 | 23.240,57 | 153,23 |
| 21 | 283.491 | 23.624,29 | 155,76 |
| 22 | 288.112 | 24.009,34 | 158,30 |
| 23 | 292.717 | 24.393,05 | 160,83 |
| 24 | 297.321 | 24.776,76 | 163,36 |
| 25 | 301.928 | 25.160,66 | 165,89 |
| 26 | 306.531 | 25.544,27 | 168,42 |
| 27 | 311.708 | 25.975,68 | 171,27 |
| 28 | 316.923 | 26.410,22 | 174,13 |
| 29 | 322.094 | 26.841,18 | 176,97 |
| 30 | 327.253 | 27.271,07 | 179,81 |
| 31 | 332.433 | 27.702,75 | 182,66 |
| 32 | 337.643 | 28.136,92 | 185,52 |
| 33 | 343.408 | 28.617,37 | 188,69 |
| 40 | 323.670 | 26.972,47 | 177,84 |
| 41 | 328.071 | 27.339,22 | 180,26 |
| 42 | 332.535 | 27.711,23 | 182,71 |
| 43 | 337.062 | 28.088,51 | 185,20 |
| 44 | 341.655 | 28.471,25 | 187,72 |
| 45 | 346.312 | 28.859,33 | 190,28 |
| 46 | 351.035 | 29.252,96 | 192,88 |
| 47 | 355.828 | 29.652,30 | 195,51 |
| 48 | 360.687 | 30.057,27 | 198,18 |
| 49 | 365.617 | 30.468,05 | 200,89 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 | 370.617 | 30.884,72 | 203,64 |
| 51 | 375.686 | 31.307,19 | 206,42 |
| 52 | 380.829 | 31.735,75 | 209,25 |
| 53 | 386.044 | 32.170,37 | 212,11 |
| 54 | 391.335 | 32.611,24 | 215,02 |
| 55 | 396.702 | 33.058,46 | 217,97 |
| 56 | 402.142 | 33.511,84 | 220,96 |
| 57 | 407.661 | 33.971,74 | 223,99 |
| 58 | 413.259 | 34.438,25 | 227,07 |
| 59 | 418.939 | 34.911,55 | 230,19 |
| 60 | 424.696 | 35.391,36 | 233,35 |
| 61 | 430.540 | 35.878,34 | 236,56 |
| 62 | 436.464 | 36.372,00 | 239,82 |
| 63 | 442.473 | 36.872,72 | 243,12 |
| 64 | 448.566 | 37.380,49 | 246,46 |
| 65 | 454.748 | 37.895,68 | 249,86 |
| 66 | 461.016 | 38.418,02 | 253,31 |
| 67 | 467.374 | 38.947,85 | 256,80 |
| 68 | 473.824 | 39.485,37 | 260,34 |
| 69 | 480.365 | 40.030,39 | 263,94 |
| 70 | 486.998 | 40.583,18 | 267,58 |
| 71 | 493.729 | 41.144,10 | 271,28 |
| 72 | 500.552 | 41.712,70 | 275,03 |
| 73 | 507.474 | 42.289,52 | 278,83 |
| 74 | 514.497 | 42.874,74 | 282,69 |
| 75 | 521.616 | 43.467,99 | 286,60 |
| 76 | 528.838 | 44.069,82 | 290,57 |
| 77 | 536.163 | 44.680,22 | 294,59 |

# 3. Avtala millum FAG og YTF um álitisfólk

## § 1. Val av álitisfólki

**Stk. 1** Limir í YTF hava rætt til at velja álitisfólk sambært niðanfyri nevndu reglum.

**Stk. 2** Vald verða 8 álitisfólk í TF Holding samtakinum uttan Eik, 2 fyri tryggingarfelagið LÍV, 8 fyri Eik Banka, 2 fyri Norðoya Sparikassa, 1 fyri Suðuroyar Sparikassa

.

## § 2. Valbæri

Álitisfólkini skulu veljast millum starvsfólk við royndum og innliti í viðurskiftum hjá fyritøkunum. Bert starvsfólk í føstum starvi kunnu veljast til álitisfólk. Royndarsett starvsfólk, starvsfólk í tíðaravmarkaðum starvi ella starvsfólk í uppsøgdum starvi, kunnu ikki veljast til álitisfólk. Valbærið heldur uppat, tá uppsøgnin fer fram. Næmingar kunnu ikki veljast til álitisfólk.

## § 3. Valtíð

**Stk. 1** Regluligt val av álitisfólki verður hildið annað hvørt ár (ólíka árstal) í november mánaði at taka við 1. januar árið eftir. Afturval kann fara fram.

## § 4. Mannagongd í sambandi við val

**Stk. 1** Val sambært § 3 verður fyriskipað av YTF. Álitisfólk eru vard frá tí løtu, úrslitið av valinum fyriliggur, og fyritøkan er skrivliga kunnað um úrslitið.

**Stk. 2** Í fráboðanini sambært stk. 1 skal standa dagfesting, tá valið fór fram, navn og starvsheiti hjá valda.

**Stk. 3** Møguligt mótmæli móti valinum skal vera "YTF" í hendi í seinasta lagi 4 vikur eftir móttøku av skrivligu fráboðanini um úrslitið av valinum. Er ósemja, verður málið lagt fyri fasta gerðarrættin.

## § 5. Val av felagsálitisfólki

**Stk 1.** Eru fleiri enn 4 álitisfólk í eini fyritøku/samtakið velja álitisfólkini sínámillum eitt felagsálitisfólk. Felagsálitisfólkið hevur til uppgávu at samskipa samstarvið millum einstøku álitisfólkini og leiðsluna í fyritøkuni.

**Stk 2.** Val av felagsálitisfólki fer fram beint eftir at álitisfólkini eru vald, smb. § 4, og freistin fyri at mótmæla, smb. somu §, er farin. Felagsálitisfólkið tekur við 1. januar árið eftir.

## § 6. Virki álitisfólksins

**Stk. 1.** Álitisfólkið umboðar limirnar og hevur rætt til at leggja fyrispurningar, klagur og tilmæli fyri leiðsluna. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerðina hjá leiðsluni, stendur tað viðkomandi frítt at heita á felagsálitisfólkið um at taka sær av málinum.

**Stk. 2.** Viðvíkur eitt mál bert einum limi ella einstøkum limum í felagnum, leggur hesin/leggja hesi sjálv málið fyri leiðaran av eindini ella varaleiðaran. Tey hava tó rætt til at heita á álitisfólkið um at gera tað. Leiðslan á fyritøkunum kann altíð seta seg beinleiðis í samband við einstaka limin. Tá limir eru vorðnir kunnaðir um tey viðurskifti, ið hava týdning í málinum, hevur viðkomandi møguleika til at senda boð eftir álitisfólkinum, smb. stk. 1.

**Stk. 3.** Í sambandi við lækking í løn hjá einum limi, verður álitisfólkið kunnað frammanundan. undantikið eru tó teir limir í eru fevndir av §16 stk. 3.í starvsavtaluni. Kunning verður framd í so góðari tíð – vanliga 7 dagar áðrenn – at álitisfólkið er so væl fyri sum møguligt at røkja áhugamálini hjá limunum

At felagsálitisfólkið ella álitisfólkið luttekur í orðaskiftinum við leiðsluna treytar samtykki frá liminum. Er slík luttøka ikki farin fram, kunnar leiðslan eftirfylgjandi um úrslitið frá orðaskiftinum Felagsálitisfólkið/álitisfólkið hevur rætt til at kunna YTF um lønarlækkingina

YTF hevur rætt til, um fakrættarliga vegin, at reisa málið, um lønarlækkingin er í stríð við sáttmálan. Um málið bara snýr seg um eina meting av persónliga avrikinum hjá einum limi, kann málið bara reisast við samtykki frá viðkomandi limi.

**Stk. 4.** Uppsøgn er treytað av, at álitisfólkið er kunnað frammanundan, her verður sæð burtur frá burturvísing. Kunning skal vera latin í so góðari tíð – *vanliga7 dagar áðrenn* – at álitisfólkið er so væl fyri sum møguligt at røkja áhugamálini hjá limunum. Freistin er treytað av at tilgongdin er væl fyriskipað og fullfíggja yvirlit, sum nágreinar alt, sum skal fara fram, fyriliggur.

## § 7. Samstarv og kunning

**Stk. 1** Álitisfólkið skal sum lið millum starvsfólkið og leiðsluna virka fyri røkt og fremjan av friðarligum og góðum samstarvi.

**Stk. 2** Tað áliggur álitisfólkinum og leiðsluni sínámillum at kunna hvørt annað um viðurskifti í fyritøkunum, sum verða mett at hava ella fáa týdning fyri arbeiðs- og starvsfólkaviðurskiftini, herímillum kunning um til- og frágongd og flytan av starvsfólki.

**Stk. 3** Verður framd broyting, sum kann væntast at hava ella fáa týdning fyri arbeiðsviðurskiftini hjá starvsfólki, skal álitisfólkið kunnast so tíðliga sum gjørligt, og áðrenn tað verður sett í verk, hava møguleika til at seta fram síni sjónarmið.

**Stk. 4** Umrøður millum leiðsluna á deildini og álitisfólkið fara fram, tá annar av pørtunum ynskir tað. Sama er galdandi við umrøðum millum leiðslu fyritøksins og felagsálitisfólkið.

**Stk. 5.** Álitisfólkið skal fremja virki sítt sum talsmaður fyri limirnar við fyriliti fyri áhugamálum limanna og fyritøksins

## § 8. Umstøður fyri arbeiðinum hjá álitisfólki

**Stk. 1** Tað arbeiðið, sum álitisfólkið ger í fyritøkunum fyri at fremja virki sítt, kann verða gjørt í arbeiðstíðini, men tó soleiðis, at tað nervar arbeiðið minst møguligt. Um álitisfólkið fer frá arbeiði sínum fyri at røkja skyldur sínar, skal hetta framman undan vera avtalað við leiðaran á staðnum ella varafólk hansara. Fer álitisfólkið frá arbeiði sínum uttan at hava havt møguleika fyri at avtala tað við leiðaran/varafólkið frammanundan, skal henda frávera fráboðast sum skjótast.

Partarnir eru samdir um, at álitisfólk kunnu nýta høli og amboð hjá fyritøkuni

**Stk. 2** Til grundútbúgving og eftirútbúgving av álitisfólki, letur fyritøkan frí við løn til luttøku í viðkomandi skeiðvirksemi. Útbúgvingin skal ikki órógva arbeiðsgongdina, og verður gjørd nærri reglugerð hesum viðvíkjandi.

**Stk.3** Til fakfelagsarbeiði letur fyritøkan frí við løn upp til 10 arbeiðsdagar árliga til hvørt álitisfólk.

Stk. 4 Í samband við sáttmálasamráðingar fáa álitisfólk frí við løn í tann mun tað er neyðugt

## § 9. Uppsøgn av álitisfólki

**Stk. 1.** Álitisfólk kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin fyrst hevur verið til viðgerðar ímillum fyritøkuna og YTF. Omanfyri nevnda regla viðvíkjandi uppsøgn av álitisfólkum hevur framhaldandi gildi aftaná, at viðkomandi er givin í hesum álitisstarvi sínum. 18 mánaðir fyri peningarstovnar og 24 mánaðir fyri tryggingarfeløgini.

**Stk. 2.** Verður álitisfólk sagt úr starvi, skal hetta vera grundað á tvingandi orsøkir.
Metir fyritøkan, at tað er neyðugt at siga viðkomandi úr starvi, skulu samráðingar takast upp um hetta við felagið, áðrenn uppsøgnin fer fram.

Heldur fyritøkan fast við uppsøgnina, verður endurgoldið samb. stk. 3.

**Stk. 3** Uppsagnartíð og endurgjald sambært § 16, í Starvsavtaluni og sambært starvsmannalógini skulu tvífaldast, tó minst 6 mánaðir.

## §10.

Omanfyri nevndu ásetingar eru eisini galdandi fyri nevndarlimir, trygdarumboð og samstarvsnevndarlimir.

Tó eru trygdarumboð og samstarvsnevndarlimir ikki umfataðir av ásetingini í § 8, stk. 4.

# 4. Avtalur um samstarvsnevndir

## § l. Inngangur

**Stk. 1** Sambært avtalu millum fyritøkuna (navn) og YTF er  sett á stovn samstarvsnevnd stytt SN. Har fleiri fyritøkur eru í sama móðurfelag, kann ein høvuðssamstarvsnevnd verða sett á stovn.

Stk 2 Fyri SN skal gerast ein starvsskipan, sum ásetur hvussu SN verður myndað, og hvussu arbeiði í SN verður skipað. Starvsskipanin verður gjørd av samstarvsnevndini og góðkend av YTF. Góðkend starvsskipan verður partur av Starvsfólkahondbókini.

## § 2. Endamál, arbeiði og uppgávur hjá SN

**Stk. 1 Endamál**
Samstarvsavtalan hevur til endamáls at bøta um kappingarføri og rakstrarúrslit hjá fyritøkuni eins og at fáa arbeiðsgleði millum starvsfólkið og mest møguligan starvstryggleika. Hetta verður gjørt við at viðgera meiningar og uppskot, sum kunnu vera partur av grundarlagnum fyri avgerðunum hjá leiðsluni, og gjøgnum kunning.

**Stk. 2 Uppgávur**
SN skal vera eitt forum at tosa um:
**a)** vanlig viðurskifti, sum hava týdning fyri starvs- og starvsfólkaviðurskifti, so sum útbúgving, eftirútbúgving, umskúling, nýtslu av tøkni v.m. eins og grundreglur fyri tilrættaleggjan av hesum,
**b)** arbeiðsstøðuna í fyritøkuni.
**c)** broytingar í virksemi, rationaliseringstiltøk og bygnaður/broytingar, sum kunnu hava týdning fyri trivnaðin og tryggleikan hjá starvsfólkinum.

A-bólkurin syrgir fyri, at givin verður ein slík kunning í SN um fíggjarstøðu fyritøkunar at limirnir hava neyðugu fortreytirnar fyri skikkaðir at kunna meta um tey evni, ið verða viðgjørd í SN.

**Stk. 3 Arbeiðsháttur**
SN skal blandast uppí so tíðliga sum gjørligt, soleiðis at sjónarmiðini hjá B-bólkinum kunnu vera við í avgerðargrundarlagnum hjá leiðsluni.

Partarnir eru samdir um at royna at fáa semju í stóran mun um tey viðurskifti, sum tosað verður um í SN.

**Stk. 4 Óviðkomandi fyri SN**
SN viðger ikki spurningar, sum viðvíkja stovning, leingjan, uppsøgn, tulking ella tillaging av sáttmálum, ella sum heild spurningar, sum náttúrliga hoyra til arbeiðsøkið hjá YTF. Somuleiðis fæst SN ikki við spurningar um viðurskifti og umstøður hjá einkultpersónum.

## § 3. Meginregla fyri arbeiðinum hjá SN

**A. Upplýsingar til SN**
Latið verður SN teir upplýsingar, ið eru neyðugir fyri arbeiðið í SN sambært § 2.
SN hevur skyldu til at viðgera fingnar upplýsingar í trúnaði.

**B. Tryggleiki og trivnaður hjá starvsfólki**

Tað hevur stóran týdning bæði fyri fyritøkuna og starvsfólkið, at hvør einstakur starvsfelagi kennir seg nøgdan við tað dagliga arbeiðið, og mest møguligan tryggleika í starvinum.
Eitt týdningarmikið ráð fyri at náa hetta mál er, at kunning fer fram so hvørt millum leiðslu og starvsfólk um viðurskifti, ið hava týdning fyri fyritøkuna, starvsfólkið og samstarvið millum leiðsluna og starvsfólk.

Hevur fyritøkan ætlanir um tiltøk, sum hava ávirkan á trivnaðin og tryggleikan hjá starvsfólkinum, skal leiðslan í fyritøkuni so tíðliga sum gjørligt kunna SN um nevndu viðurskifti. Hendan kunning skal umfata endamál, hvussu og í hvønn mun hetta fer fram, eins og eina meting av fylgjunum av tiltøkunum.

Eru ætlanir um bygnaðarbroytingar, ið broyta viðurskiftini hjá starvsfólki, skal hetta viðgerast í SN í góðari tíð áðrenn møguligar broytingar verða framdar.
Hevur YTF grundaðan varhuga av bygnaðarbroytingum, kunnu tey taka málið upp við SN.

**C. Tøkni.**
Tá tøkni verður innførd ella broytt, er tað uppgávan hjá SN at viðgera tøkniligu og fíggjarligu fylgjurnar og fylgjurnar hetta hevur fyri starvsfólkið. Fyritøkan eigur tí, so tíðliga sum gjørligt, at kunna SN um tey nevndu viðurskiftini. Hendan kunning skal umfata endamál, hvussu og í hvønn mun hetta fer fram, eins og eina meting av fylgjunum av broytingunum.
SN eigur tí at tosa um útbúgving, rokering, umskúling ella annað arbeiði fyri tey starvsfólk, ið verða ávirkað av broytingunum.

**D. Uppskot frá starvsfólkinum.**
Nevndin metir um og gevur møguligt tilmæli til leiðsluna á fyritøkuni um uppskot, sum eru komin inn frá ella gjøgnum ein lim í SN um betran av arbeiðshættum og arbeiðsviðurskiftum til gagns fyri fyritøkuna og starvsfólkið.

Uppskot frá starvsfólki, sum eru mett at vera hóskandi at viðgera í SN, verða sett fram gjøgnum ein av limunum í SN, fyri at SN kann gera eina meting av, um uppskotið eigur at vinna frama.

## § 4. Útbúgving og frídagar í sambandi við arbeiði í SN
**Stk. 1** Fyri at røkja arbeiðið í SN kann vera tørvur á supplerandi útbúgving fyri B-bólkin í nevndini. fyritøkan gevur møguleika fyri, at B-bólkurin kann taka lut í relevantari útbúgving. Avtala hesum viðvíkjandi verður gjørd millum YTF og starvsfelagan, og letur fyritøkan frídagar við løn.

## § 5. Serkøn
**Stk. 1** Tá viðurskifti verða viðgjørd, sum krevja eina serstaka bakgrundsvitan, kann SN, um semja er um tað, lata serkønar starvsfelagar, ið ikki eru limir í SN, luttaka á SN fundinum.

## § 6. Útreiðslur
**Stk. 1** Fyritøkan rindar útreiðslurnar í samband við virksemi hjá nevndini og letur høli til hetta virksemið.

## Dømi um Starvsskipan fyri samstarvsnevndir.

**1**. Samstarvsnevndin (frameftir kallað “Nevndin”) er myndað av tveimum bólkum:

**A-bólkurin:** Stjórnin tilnevnir 4 limir. Í minsta lagi ein skal vera úr stjórnini hjá fyritøkuni. Hinir limirnir skulu veljast millum leiðarar í fyritøkunum. Leiðarar niður til og við dagligir leiðarar kunnu veljast í A-bólkin.

**B-bólkurin**: Øll onnur starvsfólk á lønarlistanum í fyritøkuni velja sínámillum 2 limir og 2 varalimir. Álitisumboðini velja sínámillum 2 limir og 2 varalimir. Valið er fyri 2 ár í senn. Afturval kann verða.

Formaðurin í nevndini er úr A-bólkinum. Næstformaðurin er úr B-bólkinum.
Starvsfólk á Starvsfólkadeildini skipa fyri vali av starvsfólkaumboðum. Valið fer fram ólíka ár í november mánaði, at taka við í januar, samstundis sum álitisumboð verða vald.

**2.** Nevndin hevur regluligar fundir einaferð hvønn ársfjórðing ikki seinni enn 6. viku í ársfjórðinginum. Fundardagar verða ásettir fyri 1 ár í senn á fyrsta fundi í einum ári.

**3.** Um tað ikki hevur verið gjørligt at hildið regluligan ársfjórðingsfund, ásetir formaðurin, eftir avtalu við næstformannin, ein nýggjan dag fyri fundin. Hesin nýggi fundur skal verða so skjótt, sum til ber.

**4.** Fundir útyvir teir regluligu ársfjórðingsfundirnar verða fráboðaðir av formanninum, tá hann heldur hettar verða neyðugt, ella tá minst helvtin av nevndarlimunum ynskja tað.

**5.** Formaðurin boðar øllum limum skrivliga til fundar. Vanliga skal hetta gerast við einari viku freist.

**6.** Saman við fundarboðum skal ein fundarskrá, ið formaðurin og næstformaðurin hava avtalað, fylgja við.

**7.** Formaðurin leiðir fundirnar. Í teimum førum, har formaðurin ikki er til staðar, verður fundurin leiddur av øðrum limi úr A-bólkinum.

**8.** A- og B-bólkurin velja skrivara í felag. Valið er fyri 2 ár í senn. Afturval kann verða.
Berst skrivaranum frá, verður annar valdur í hansara stað av fundarluttakarunum.
Skrivarin hevur ábyrgdina av gerðabókini hjá nevndini.

**9.** Fundirnir verða vanliga hildnir í Tórshavn. Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 2/3 av limunum eru til staðar.

**10.** Eftir fundin verður fundarfrágreiðing skrivað, har tíð, stað, skrá og nøvnini á fundarluttakarunum verða nevnd. Stuttur samandráttur fyri hvørt evni á dagsskránni verður orðaður. Fundarfrágreiðingin verður send limunum innan 7 dagar til viðmerkingar. Viðmerkingar eiga innan freist, ásett av skrivaranum, at vera skrivaranum í hendi. Skrivarin tillagar frágreiðingina samsvarandi viðmerkingunum, og letur formanni og næstformanni hana til góðkenningar og undirskriftar.

Um formaðurin ikki hevur luttikið á fundi, skrivar tann, sum leiddi fundin, undir í hansara stað. Um næstformaðurin ikki hevur luttikið á fundi, ger hann av, hvør skal undirskriva vegna seg.
Fundarfrágreiðingin verður goymd í gerðabókini.

**11.** Nevndin hevur ábyrgdina av, at starvsfólkini í fyritøkunum verða kunnað um tað arbeiði hjá nevndini, ið ikki verður viðgjørt í trúnaði.

Kunningin eigur at verða løgd á atkomuligum stað so skjótt sum fundarfrágreiðingin er undirskrivað.

**12.** Nevndarlimunum er áløgd tagnarskylda – eisini eftir at teir eru farnir úr samstarvsnevndini – um upplýsingar, sum teir hava fingið í trúnaði.

## 5. Protokollat um eldrapolitik

Protokollat um eldrapolitikk: Partarnir eru samdir um, at ein virkin eldrapolitikkur er til frama fyri bæði fyritøku og starvsfólk. Tað áliggur leiðslunum í fyritøkunum, sum henda semja viðvíkur, at arbeiða fyri at fáa eldrapolitikk innførdan á arbeiðsplássum, har hetta ikki longu er galdandi.
Endamálið við einum eldrapolitikki er at geva hesum starvsbólki serligan ans, veita teimum møguleikar og tilboð, sum eru í tráð við teirra lívs- og yrkisstøðu og støðuna hjá fyritøkuni.
Sum meginregla merkir hetta, at fyritøkan setur orku av til at kanna hvønn tørv og hvørji ynski, hesin starvsbólkur hevur, og viðger í hvønn mun fyritøkan kann ganga hesum ynskjum og tørvi á møti.
Hetta kann gerast við at bjóða eldrasamrøður til starvsfólk eftir ávísan aldur. Ein eldrapolitikkur kann innihalda nøkur heilt ítøkilig tilboð viðvíkjandi niðursettari arbeiðstíð, feriudøgum e.o. fyri starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri.

# 6. Protokollat um ambæting av sjálvtøkum og serlig boðsending

**Ambæting av sjálvtøkum**
Samsýningin fyri tilkall er kr. 400,- fyri hvørja ferð, um vitjanin ikki er longri enn 1 tími.

Er tørvur á service, sum tekur meira enn 1 tíma, verður hvør eftirfylgjandi byrjaður tími samsýndur við kr. 200,-.

Samsýnt verður fyri ta tíð, sum starvsfólkið er burtur frá sínum bústaði.

Útreiðslur til ferðing verða bara samsýndar, um tað er meira enn 5 km millum bústað og sjálvtøku, og tá verða rindaðir kilometurpengar eftir galdandi takstum fyri allan teinin.

Við hesum dettur skjal um protokollat um ambæting av sjálvtøkum burtur.

**Serlig boðsending:**
Fyri serliga boðsending uttanfyri vanliga arbeiðstíð í sambandi við ávaringarkall og aðrar tekninskar innleggingar, døgnboks, o.t. verður avroknað eftir reglum fyri yvirarbeiði/frígongu sambært § 3. Avroknað verður fyri í minsta lagi 2 tímar, ferðing íroknað, men í mesta lagi frá tí at starvsfólkið varð boðsent til ta løtu, tá ið vanligur arbeiðsdagur hjá avvarðandi byrjar. Ferðaútreiðslur verða goldnar eftir rokning.

# 7. Protokollat um hugtøk, ið partarnir nýta í sáttmálasamráðingum

Hetta protokollat hevur til endamáls, at forða fyri misskiljingum og ymiskum tul¬kin¬gum av sáttmálanum. Í orðalista niðanfyri verða hugtøk, ið partarnir nýta í sátt¬mála¬num, lýst annahvørt við í dømum ella frágreiðing at lýsa í hvørji merking hugtakið verður nýtt, ella við at lýsa merkingina av hugtakinum við tilsvarandi orði á frem¬man¬dum máli.

**Orðalisti :**

**Bruttoløn:** løn, soleiðis sum henda er ásett í lønartalvuni, eisini nevnd skalaløn. Bruttolønin er lønin, áðrenn eitt nú egið eftirlønargjald er frádrigið, og áðrenn partur arbeiðsgevarans er lagdur afturat.

**Frígonga:** frítíð, sum verður hildin í arbeiðstíðini, vanliga sum samsýning fyri yvirtíðararbeiði. Frígonga telur ikki sum vanlig frítíð (summarfrí v.m.). Eisini nevnt avspáking.

**Meirarbeiði:** arbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð, ið ikki verður roknað ella samsýnt sum yvirtíð.

**Starvsaldursviðbót:** Anciennitetsískoyti

**Viktíð:** flextíð.

# 8. Høvuðsavtala  millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og SFS

**§1**

Henda høvuðsavtalan hevur gildi fyri limir í SFS, hvørs lønar- og setanarviðurskifti eru ásett í sáttmálanum millum FAG og SFS.

**§2**

Rætturin hjá Eik Banka, sparikassunum og P/F Elektron at leiða og býta arbeiðið út verður framdur eftir sakligum leiðreglum – herundir við neyðugum atliti til áhugamálini hjá starvsfólkunum – og annars í samsvari við tær til eina og hvørja tíð galdandi lógir og tær millum partarnar inngingnu avtalur og sáttmálar – herundir serliga avtalurnar um samstarvsnevnd og álitisfólk.

**§3**

Partanir viðurkenna, at tað stendur starvfólkunum frítt at vera limir í felagi og at luttaka í arbeiði felagsins eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum í sáttmálunum og avtalunum.

**§4**

Kollektivir sáttmálar um lønar- og setanarviðurskifti fyri starvsfólk í Eik Banka, sparikassunum og Elektron kunnu bara gerast millum FAG og SFS.

**§5**

Í tí tíðarskeiði, sáttmálin er galdandi, kann arbeiðssteðgur ikki setast í verk. Við arbeiðssteðg er at skilja verkbann, verkfall, blokada og boykott og eisini skipað avfólkan av Eik Banka, sparikassunum og P/F Elektron ella pørtum av nevndu fyritøkum. Í sama mun sum higartil kann samhugaarbeiðssteðgur setast í verk.

**§6**

Tá ein sáttmáli um lønar- og setanarviðurskifti er uppsagdur, skal beinanvegin farast undir samráðingar um nýggjan sáttmála. Er semja ikki fingin í lag – tann dag sáttmálin fer úr gildi – um nýggjan sáttmála at koma í gildi samstundis sum higartil galdandi sáttmálin fer úr gildi, skulu ásetingarnar í sáttmálanum, sum fór úr gildi, framvegis fylgjast, til nýggjur sáttmáli er samtyktur og settur í gildi, ella arbeiðsstegður er settur í verk sambært ásetingunum í § 7.

**§7**

*Stk.* 1 FAG og SFS viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum til at ordra arbeiðssteðg sambært ásetingunum í stk. 2-4.

*Stk.* 2 Arbeiðssteðgur av eini hvørji orsøk ella í ein hvønn mun kann bara verða ordraður eftir at verða viðtikin á einum til hetta endamál lógliga innkallaðum fundi í FAG og í SFS, samsvarandi viðtøkum felagsins.

*Stk.* 3 Ætlanir um ein slíkan fund, sum nevndur í stk. 2, um uppskot um arbeiðssteðg, skulu fráboðast hinum partinum í seinasta lagi 1 mánað, áðrenn arbeiðssteðgurin eftir ætlan verður settur í verk. Fráboðanin um avgerðina frá fundinum skal latast í seinasta lagi 14 dagar, innan møguligur arbeiðssteðgur verður settur í verk. Hendan fráboðan skal so innihalda nærri upplýsingar um arbeiðssteðgin.

*Stk*. 4 Fráboðan sambært stk. 3, 1. og 2. punkt skal vera skrivlig – møguliga um telefax – og skal, um hon verður fráboðað tann dagin freistin er, vera hinum partinum í hendi innan kl. 12.00. Ætlar hin parturin eftir hetta at geva fráboðan um arbeiðssteðg sama dag at verða settur í verk samstundis, skal slík fráboðan vera tí fyrra partinum í hendi innan kl. 24.00 sama dag. Fráboðan kann ikki latast leygardagar, sunnudagar, halgidagar og frídagar sambært sáttmála.

*Stk*. 5 Tá ósemjan er av, fer starvsfólkið til arbeiðis aftur á tí staði, viðkomandi starvaðist beint áðrenn ósemjan byrjaði, og tað áliggur báðum pørtum at viðvirka til at fáa vanlig og friðarlig arbeiðsviðurskifti aftur.

**§8**

*Stk*. 1 Ordraður arbeiðssteðgur sambært § 7 kann fevna um starvsfólk fevnd av hesi høvuðsavtalu, tó ikki deildarleiðarar, og starvsfólk flokkaði í 6. lønarflokki og hægri.

*Stk*. 2 Eik Banki, sparikassarnir og P/F Elektron kunnu herumframt krevja, at hetta tal av starvsfólki verður hildið uttan fyri luttøku í arbeiðssteðginum:

a) Eik Banki:

Umsitingin, 5 starvsfólk
Avgreiðsludeildir í Tórshavn (Sverrisgøta 3, Ungdómsdeildin og Hornabøður), 1 starvsfólk á hvørjari deild
Suðuroy, Sandoy, Vágar, 1 starvsfólk á hvørjari oyggj
Kollafjørður, 1 starvsfólk
Vestmanna, 1 starvsfólk
Fuglafjørður/Gøta, 1 starvsfólk
Klaksvík, 1 starvsfólk
Saltangará, 1 starvfólk
Norðskála, 1 starvsfólk
Strendur, 1 starvsfólk

b) Norðoya Sparikassi, 2 starvsfólk

c) Suðuroyar Sparikassi, 1 starvsfólk

d) P/F Elektron, 7 starvsfólk

Starvsfólk í Eik Banka og sparikassunum, sum smb. stk. 2 verða hildin uttanfyri luttøku í arbeiðssteðgi, kunnu bara verða ordraði til at gera arbeiði í sambandi við vaktarhald, umsjón við tekniskum útbúnaði, og annars í sambandi við varðveiting av útbúnaði og programmum hjá Eik Banka og sparikassunum.

Starvsfólkini á Elektron, sum sambært hesi avtalu verða hildin uttanfyri arbeiðssteðg, kunnu bara verða sett at tryggja raksturin og ikki til menning, nýuppsetingar, broytingar, fyrispurningar, útskriving og pakking.

Onnur undantøk kunnu verða givin, um SFS og FAG eru samd um hetta.

Umboð fyri SFS sleppa undir arbeiðssteðgi inn á Elektron at hava samrøður við tey starvsfólk, sum sambært stk. 2 d) eru til arbeiðis.

**§ 9**

Geva samráðingarnar um nýggjan sáttmála einki úrslit, eru partarnir samdir um, at spurningurin skal viðgerast eftir reglunum hjá "Semingsstovninum", sb. lóg nr. 86 frá 31.mars 1928 við seinni broytingum. Partarnir vátta, at teir ætla at halda reglurnar í nevndu lóg.

**§ 10**

*Stk. 1* Tulking av:

- hesi høvuðsavtalu millum FAG og SFS,
- sáttmálum viðvíkjandi lønar- og arbeiðsviðurskiftum avtalaðir millum FAG og SFS,
- øðrum sáttmálum/avtalum millum FAG og SFS,

kann av báðum pørtum – eftir samráðingar uttan úrslit – leggjast fyri ein Fasta Gerðarrætt, sí eisini § 11.

§ 11

*Stk. 1* Gerðarrætturin kann døma tann ella tey, ið hava luttikið í sáttmálastríðnum, eina bót, sum skal ognast klagaranum. Er sáttmálabrotið um ikki at hava goldið eina skylduga peningaupphædd, kann dómurin í staðin fyri bót vera rindan av hesi peningaupphædd. Um annað ikki er viðtikið frammanundan, kann einum felag sum so bara vera álagt rættarlig ábyrgd, um tað hevur luttikið virkið í klagaða málinum.

*Stk. 2* Bótin verður ásett við fyriliti fyri øllum viðurskiftunum í málinum, herundir fíggjarorku partanna, og við hóskandi fyriliti fyri í hvønn mun avtalu- ella sáttmálabrotið hevur verið fyrigeviligt frá avtalu- ella sáttmálabrótarans síðu. Tá mett verður um arbeiðssteðg, sum er í stríð við sáttmálan, skal fyrilit takast fyri, um tað frá mótpartsins síðu fyriliggja viðurskifti av slíkum slag, at arbeiðssteðgurin verður hildin at vera rímilig reaktión. Bótin kann annars fella heilt burtur, um linnandi umstøður eru, og skal fella burtur, um atburður í stríð við sáttmálan frá mótpartsins síðu verður mettur at geva rímiliga orsøk til arbeiðssteðgin. Harafturat skal bótin fella burtur, um tað verður prógvað, at ein arbeiðssteðgur er elvdur av trivnaðar orsøkum, sum mótparturin hevur ábyrgdina av. Bót kann ikki verða áløgd teimum luttakarum í einum arbeiðssteðgi, sum hava tikið upp aftur arbeiðið, áðrenn felagsfundur hevur verið hildin, ella hava fylgt einum tilmæli frá hesum fundi um beinanvegin at fara aftur til arbeiðis, uttan so at tað verður prógvað, at eingin rímilig orsøk er til arbeiðssteðgin, ella hesin verður hildin at vera liður í eini skipaðari atgerð.

**§ 12**

*Stk. 1* Henda høvuðsavtala kemur í gildi 1. februar 2011, og er galdandi, til hon við 6 mánaða fráboðan verður uppsøgd av einum av pørtunum at fara úr gildi, tá ein oktober mánaði endar, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi tann 31. oktober 2013. Samstundis fer "Avtala um neyðturviligan rakstur av Elektron undir einum arbeiðssteðgi" millum SFS og Elektron, dagfest 12. mars 1999, úr gildi.

*Stk. 2* Tann av pørtunum, sum hevur ynski um broytingar í høvuðsavtaluni, skal 6 mánaðir innan uppsøgnina boða hinum partinum frá, soleiðis at samráðingar verða tiknar upp við tí endamáli, at fáa semju og harvið sleppa undan uppsøgn av høvuðsavtaluni.

*Stk. 3* Eru samráðingar um endurnýggjan av høvuðsavtaluni eftir uppsøgn av hesari ikki lidnar innan hon fer úr gildi, er høvuðsavtalan framvegis galdandi, inntil tann galdandi kollektivi sáttmálin millum partarnar er avloystur av einum nýggjum.

Tórshavn tann 07. oktober 2010

**Vegna S F S**
Anna Margretha Otthamar, formaður

Súsanna Lydersen, næstformaður

Asbjørg Arge

Kaja Joensen

Alexandur Johansen

**Vegna Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Jóhan Páll Joensen, formaður

# 9. Høvuðsavtala millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Yrkisfelagið Trygdina

**§ 1** Henda høvuðsavtalan hevur gildi fyri limir í "Yrkisfelagið Trygdin", hvørs lønar- og setanarviðurskifti eru ásett í sáttmálanum millum FAG og Yrkisfelagið Trygdina.

**§ 2** Rætturin hjá tryggingarfeløgunum at leiða og fordeila arbeiðið skal fremjast eftir sakligum stevnumiðum - herímillum við neyðugum fyriliti til áhugamál starvsfólksins - og annars við at yvirhalda tær til eina og hvørja tíð galdandi lógir og tær millum partarnar inngingnu avtalur og sáttmála.

**§ 3** FAG viðurkennur, at tað stendur starvsfólkunum frítt at vera limir í felagnum og at luttaka í arbeiði felagsins eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum í sáttmálunum og avtalunum.

**§ 4** Sáttmálar um lønar- og setanarviðurskifti kunnu bert gerast millum felagið og tryggingarstovnarnar.

**§ 5** Í tí tíðarskeiði, sáttmálin er galdandi, kann arbeiðssteðgur ikki setast í verk. Við arbeiðssteðg er at skilja verkbann, verkfall, blokada og boykott og eisini skipað avfólkan av tryggingarfeløgunum ella pørtum av tryggingarfeløgunum. Í sama mun sum higartil kann samhugastríð setast í verk.

**§ 6** Tá ein sáttmáli um lønar- og setanarviðurskifti er uppsagdur, skal beinanvegin farast undir samráðingar um nýggjan sáttmála. Er semja ikki fingin í lag - tann dag sáttmálin fer úr gildi - um nýggjan sáttmála at koma í gildi samstundis sum sáttmálin higartil fer úr gildi, skulu ásetingarnar í sáttmálanum, sum fór úr gildi, framvegis fylgjast, til nýggjur sáttmáli er samtyktur og settur í gildi, ella arbeiðssteðgur er settur í verk sambært ásetingunum í § 7.

**§ 7**

**Stk. 1** FAG og Yrkisfelagið Trygdin viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum til at ordra arbeiðssteðg sambært ásetingunum í stk. 2 - 4.

**Stk. 2** Arbeiðssteðgur av eini hvørji orsøk ella í ein hvønn mun kann bert verða ordraður eftir at verða viðtikin á einum til hetta endamál lógliga innkallaðum fundi í FAG ella í Yrkisfelagnum Trygdini.

**Stk. 3** Ætlanir um ein slíkan fund, sum nevndur í stk. 2, um uppskot um arbeiðssteðg, skal fráboðast hinum partinum í seinasta lagi 1 mánaða, áðrenn arbeiðssteðgurin eftir ætlan verður settur í verk. Fráboðanin um avgerðina frá fundinum skal latast í seinasta lagi 14 dagar, innan møguligur arbeiðssteðgur verður settur í verk. Hendan fráboðan skal so innihalda nærri upplýsingar um arbeiðssteðgin.

**Stk. 4** Fráboðan sambært stk. 3, l. og 2. punkt skal vera skrivlig - møguliga um telefax - og skal, um hon verður fráboðað tann dagin freistin er, vera hinum partinum í hendi innan kl.12.00 lokala tíð (lokala tíð hjá hinum partinum). Ætlar hin parturin eftir hetta at geva fráboðan um arbeiðssteðg sama dag at verða settur í verk samstundis, skal slík fráboðan vera tí fyrra partinum í hendi innan kl. 24.00 lokala tíð (lokala tíð hjá tí fyrra partinum) sama dag. Fráboðan kann ikki latast leygardagar, sunnudagar, halgidagar og frídagar sambært sáttmála.

**Stk. 5** Tá ósemjan er av, fer starvsfólkið til arbeiðis aftur á tí staði, viðkomandi starvaðist beint áðrenn ósemjan byrjaði, og tað áliggur báðum pørtum at viðvirka til at fáa vanlig og friðarlig arbeiðsviðurskifti aftur.

**§ 8** Ordraður arbeiðssteðgur sambært § 7 kann fevna um starvsfólk umfataði av hesi høvuðsavtalu.

Fylgjandi tal av starvsfólki kann krevjast at vera hildin uttan fyri luttøku í einum arbeiðssteðgi:

| | |
|---|---|
| Tryggingarfelagið Føroyar: | 5 starvsfólk og harafturat sýnsmenn. |
| Føroya Lívstrygging. | 1 starvsfólk |

Treytin er at:
Starvsfólk, sum sambært § 8 vera hildin uttan fyri luttøku í einum arbeiðssteðgi, kunnu bert ordrast til neyðugt arbeiði fyri at varðveita ella bjarga skaddar lutir, minka um vandan fyri at skaðin gerst størri, ella tá tað gerst bráðneyðugt at fyribyrgja skaða, somuleiðis umsjón við tekniskum útbúnaði, hardware og software útbúnaði og annars tekniskum útbúnaði yvirhøvur.

**§ 9** Geva samráðingarnar um nýggjan sáttmála einki úrslit, eru partarnir samdir um, at spurningurin skal viðgerast eftir reglunum hjá "Semingsstovninum", sb. lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 við seinni broytingum. Partarnir vátta, at teir ætla at halda reglurnar í nevndu lóg.

**§ 10**

**Stk. 1** Tulking av:

- hesi høvuðsavtalu millum FAG og Yrkisfelagið Trygdina,
- sáttmálum viðvíkjandi lønar- og arbeiðsviðurskiftum avtalaðir millum FAG og Yrkisfelagið Trygdina,
- øðrum sáttmálum/avtalum millum FAG og Yrkisfelagið Trygdina,

kann av báðum pørtum - eftir samráðingar uttan úrslit - leggjast fyri ein Fasta Gerðarrætt.

§ 11

**Stk. 1** Gerðarrætturin kann døma tann ella tey, ið hava luttikið í sáttmálastríðnum, eina bót, sum skal ognast klagaranum. Er sáttmálabrotið um ikki at hava goldið eina skylduga peningaupphædd, kann dómurin í staðin fyri bót vera rindan av hesi peningaupphædd. Um annað ikki er viðtikið frammanundan, kann einum felag sum so bert vera álagt rættarlig ábyrgd, um tað hevur luttikið virkið í klagaða málinum.

**Stk. 2** Bótin verður ásett við fyriliti fyri øllum viðurskiftunum í málinum og við hóskandi fyriliti fyri í hvønn mun lógarbrotið hevur verið fyrigeviligt frá lógbrótarans síðu. Tá mett verður um arbeiðssteðg, sum er í stríð við sáttmálan, skal fyrilit takast fyri, um tað frá mótpartsins síðu fyriliggja viðurskifti av slíkum slag, at arbeiðssteðgurin verður hildin at vera rímilig reaktión. Bótin kann annars fella heilt burtur, um linnandi umstøður eru, og skal fella burtur, um atburður í stríð við sáttmálan frá mótpartsins síðu verður mettur at geva rímiliga orsøk til arbeiðssteðgin. Harafturat skal bótin fella burtur, um tað verður prógvað, at ein arbeiðssteðgur er elvdur av trivnaðar orsøkum, sum mótparturin hevur ábyrgdina av. Bót kann ikki verða áløgd teimum luttakarum í einum arbeiðssteðgi, sum hava tikið upp aftur arbeiðið, áðrenn felagsfundur hevur verið hildin, ella hava fylgt einum tilmæli frá hesum fundi um beinanvegin at fara aftur til arbeiðis, uttan tað verður prógvað, at eingin rímilig orsøk er til arbeiðssteðgin, ella hesin verður hildin at vera liður í eini skipaðari atgerð.

§ 12

**Stk. 1** Sett verður á stovn samstarvsnevnd, har umboð fyri leiðslu og álitisfólk sita. Henda skal hava innlit í tey viðurskifti, sum framganga av reglugerð partanna millum. Henda reglugerð skal tó endaliga góðkennast av báðum pørtum, sum hesin sáttmálin umfatar.

§ 13

**Stk. 1** Henda høvuðsavtala kemur í gildi tann 1. februar 2011, og er galdandi, til hon við 6 mánaða fráboðan verður uppsøgd av einum av pørtunum at fara úr gildi, tá ein oktober mánaði endar, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi tann 31. oktober 2013.

**Stk. 2** Tann av pørtunum, sum hevur ynski um broytingar í høvuðsavtaluni, skal 6 mánaðar innan uppsøgnina boða hinum partinum frá, soleiðis at samráðingar verða tiknar upp við tí endamáli, at fáa semju og harvið sleppa undan uppsøgn av høvuðsavtaluni.

**Stk. 3** Eru samráðingar um endurnýggjan av høvuðsavtaluni eftir uppsøgn av hesari ikki lidnar innan hon fer úr gildi, er høvuðsavtalan framvegis galdandi, inntil tann sáttmálin verður avloystur av einum nýggjum.

Tórshavn, tann 7. oktober 2010

**Yrkisfelagið Trygdin:** **Føroya Arbeiðsgevarafelag:**

Leif Ellingsgaard, formaður

Jóhan Páll Joensen, formaður

Ragnfríð Danielsen, næstformaður

Tordis Debes Eiriksfoss

Hildigunn Poulsen

Olaf Sloan